SVARLISTI

Gunnvá Dam

# Eg skrivi

***Skrivligt føroyskt til miðdeild og framhaldsdeild***

9



**Gunnvá Dam**

# EG SKRIVI 9

***Skrivligt føroyskt til miðdeild og framhaldsdeild***

*Myndir eftir Edward Fuglø*

Føroya Skúlabókagrunnur

© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Gunnvá Dam
EG SKRIVI 9
Skrivligt føroyskt til miðdeild
Myndir: Edward Fuglø
Litlagt: Vasti
© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur
Umbróting og prentumsiting: Vasti/Estra
Útgáva: Føroya Skúlabókagrunnur, Tórshavn 2010

ISBN: 978-99918-2-055-2

© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

# INNIHALD


| | | |
|---|---|---|
| **Formæli** | síða | 6–7 |
| **Samspæl** | síða | 8–13 |
| Bókstavaraðið | síða | 8 |
| Orðaflokkauppgáva | síða | 9 |
| Bundin navnorð | síða | 10 |
| Orðabókauppgáva | síða | 10 |
| Umsøgn, grundliður og ávirki | síða | 11 |
| Lýsingarorð | síða | 11 |
| Navnorð, sernavn ella talorð | síða | 12 |
| Sernøvn | síða | 13 |
| **Størstur er kærleikin** | síða | 14–18 |
| Høvuðssetningar og eykasetningar | síða | 14–18 |
| Sambindingarorð | síða | 16–17 |
| Umsøgn, grundliður og komma | síða | 18 |
| **Harpuríma** | síða | 19–23 |
| Harpuríma | síða | 19 |
| Sagnorð | síða | 20–23 |
| Skyldskaparorðini | síða | 23 |
| **Vit arbeiða við kvæðum og rímum** | síða | 24–27 |
| Navnorð, sagnorð, lýsingarorð og talorð | síða | 24–27 |
| Krossorðagáta | síða | 27 |
| **Tín besta kærleikssøga** | síða | 28–31 |
| Fyrisøgn | síða | 28 |
| Uppgávur til fyrisøgn | síða | 28–31 |
| **Skrínið** | síða | 32–38 |
| Orðaflokkauppgávur | síða | 32–33 |
| Høvuðssetningar og eykasetningar | síða | 34 |
| Skyldskaparorðini | síða | 34 |
| Fyrisøgn | síða | 35 |
| Uppgávur til fyrisøgn | síða | 35–36 |
| Eykauppgáva | síða | 37 |
| **Merkisdagar og høgtíðir** | síða | 38–44 |
| Villiniborg | síða | 38 |
| Benda sagnorð | síða | 39 |
| Benda lýsingarorð | síða | 40 |
| Eykauppgáva | síða | 41 |
| Lýsingarorð | síða | 42 |
| Finna fjaldar merkisdagar | síða | 43–44 |
| **Bløð** | síða | 45–46 |
| Aftursøgn og lyklaorð | síða | 45 |
| Skriva aftursøgn | síða | 46 |
| Eykauppgáva | síða | 46 |
| **Vit lesa eitt blað saman** | síða | 47–51 |


© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

| | | |
|---|---|---|
| Fyrisøgn | síða | 47 |
| Uppgávur til fyrisøgn | síða | 47–48 |
| Persónsfornøvn | síða | 49–50 |
| Ávísingarfornøvn | síða | 50–51 |
| **Yrkisbókmentir** | síða | 52–54 |
| Býta bøkur í yrkisbókmentir og fagurbókmentir | síða | 52 |
| Samansett navnorð | síða | 53 |
| Finna fjaldar yrkisbókmentir | síða | 54 |
| **Yrkistekstir í einum blaði** | síða | 55–57 |
| Fyrisøgn | síða | 55 |
| Uppgávur til fyrisøgn | síða | 55–56 |
| Krossorðagáta | síða | 57 |
| **Hvat stendur í einum blaði** | síða | 58–61 |
| Tekn í teksti | síða | 58 |
| Høvuðssetningar og eykasetningar | síða | 59 |
| Seta tekn í tekst | síða | 60 |
| Finna villur | síða | 61 |
| **Samskifti** | síða | 62–64 |
| Skriva boð | síða | 62–64 |
| **Vit gera eina samrøðu** | síða | 65–68 |
| Spurnarfornøvn | síða | 65 |
| Spurnarhjáorð | síða | 66–67 |
| Krossorðagáta | síða | 68 |
| **Bókaummæli** | síða | 69–71 |
| Fyrisøgn | síða | 69 |
| Uppgávur til fyrisøgn | síða | 69–71 |
| **Blaðgrein** | síða | 72–74 |
| Navnorð, sagnorð og lýsingarorð | síða | 72–73 |
| Skriva grein | síða | 74 |
| **Tykkara blað** | síða | 75–77 |
| Ognarfornøvn | síða | 75 |
| Fornøvn | síða | 76 |
| Fyrisøgn | síða | 76–77 |
| Uppgávur til fyrisøgn | síða | 77 |
| **Skrínið** | síða | 78–82 |
| Orðaflokkauppgáva | síða | 78–80 |
| Benda navnorð | síða | 79 |
| Benda sagnorð | síða | 80 |
| Benda lýsingarorð | síða | 80 |
| Fornøvn | síða | 80 |
| Hjáorð | síða | 81 |
| Talorð | síða | 81 |
| Seta tekn í tekst | síða | 81 |
| Krossorðagáta | síða | 82 |
| **Eykauppgávur** | síða | 83–88 |
| **Vegleiðing** | síða | 89–91 |

© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

# Formæli

EG SKRIVI 9, við undirheitinum: *Skrivligt føroyskt til miðdeild og framhaldsdeild,* er 9. bókin í røðini av rættskrivingar- og mállæruheftum til miðdeild fólkaskúlans. Mállæruheftini eru ikki ætlað ávísum floksstigi, men kunnu vegleiðandi nýtast úr 5. flokki (ella seint í 4. flokki) upp í 9. flokk, so sum lærarin heldur vera hóskandi. EG SKRIVI 9 er hóskandi at nýta í 8. flokki.

Eg skrivi røðin umfatar 9 hefti. Fyri at koma ígjøgnum øll heftini mugu flokkarnir arbeiða við í minsta lagi tveimum heftum árliga.

Í øllum málæruheftunum eru málæruuppgávur, fyrisøgn, uppgáva til fyrisøgn, aftursøgn og ymsar stuttligar uppgávur.

Málæran í EG SKRIVI 9 byggir á tað, sum næmingarnir hava lært í teimum fyrru bókunum.

Gjøgnum alla bókina havi eg lagt dent á at fáa næmingarnar at skilja tað, teir gera, heldur enn at teir t.d. benda eina ørgrynnu av orðum uttan at hugsa um, hví hesi orð verða bend so ella so.

Í øllum bókunum eru partar, nevndir „Skríníð“. Hesir partar taka saman um tað, ið næmingarnir áður hava arbeitt við, so til ber at fylgja við, um næmingarnir minnast til tað, sum teir hava lært.

*Fyrisagnirnar eru gjørdar sum innskrivingarfyrisagnir á tvinnanda torleikastigum.* Men er onkur næmingur, ið er førur fyri at skriva fyrisøgnina sjálvur, ber sjálvandi til, at næmingurin skrivar fyrisøgnina í eitt skrivihefti. Summar fyrisagnir eru so mikið langar, at tær verða ikki skrivaðar í einum. Her veldst um hvønn einstakan lærara, um hann skrivar fyrisøgnina í tveimum, ella um hann heldur loypur okkurt um. *Gjørt verður vart við, at fyrisagnirnar, so sum tær eru ætlaðar at skriva á teimum báðum torleikastigunum, eru lagdar hjá í hesari útgávuni.*

Fyrireikandi uppgávur eru til allar fyrisagnir. Her eigur at verða lagdur stórur dentur á, at næmingarnir stava orðini rætt í sjálvari fyrireikingini.

EG SKRIVI umfatar ta málæru og rættskriving, sum eftir leiðbeinandi lesiætlan krevst til miðdeild fólkaskúlans.

Heftini eru býtt sundur í partar, ið hava somu heiti sum partarnir í teimum trimum „Kom og skriva“ bókunum. Hava næmingarnir arbeitt við hesum málæruheftum, sum nú verða givin út, kunnu lærari og næmingar vera vísir í, at næmingarnir t.d. hava lært at finna umsøgn og grundlið, áðrenn teir verða bidnir um tað í „Kom og skriva“- bókunum.

Lat meg leggja dent á, so at eingin misskiljing skal vera, at tað ber væl til hjá øllum næmingum at arbeiða við EG SKRIVI-heftunum, sama um teir brúka oman fyri nevndu bókarøðina ella ikki.

Hóskandi er, at 1 – 2 undirvísingartímar verða nýttir um vikuna, alt eftir hvussu langir partarnir eru, og um fyrisøgn ella aftursøgn er við í partinum. Til ber eisini at lata næmingarnar fyrireika fyrisøgnina heima við hús.

Tær stuttligu uppgávurnar – so sum krossorð, orðagátur, villiniborgir og uppgávur at finna villur – eru eykauppgávur. Nakrar eru beinleiðis knýttar at málæruni, arbeitt verður við, aðrar ikki. Til ber tí at siga, at um næmingarnir ikki hava tíð at arbeiða við hesum uppgávum í skúlanum, kunnu teir gera tær lidnar heima við hús. Tó haldi eg, at næmingarnir eiga at sleppa at loysa hesar uppgávur í skúlanum eisini, kanska serliga tí, at hesar uppgávurnar eru øðrvísi enn hinar.

Í hesum heftinum eru nakrar síður við *eykauppgávum.* Ætlanin við hesum síðum er, at næmingar, ið arbeiða skjótt, kunnu halda á at arbeiða á eykasíðunum, tá ið teir eru lidnir við tað, teir skulu gera. Soleiðis slepst kanska undan, at skjótir næmingar sita og bíða eftir hinum. Eykauppgávurnar aftast í bókini eru sostatt ikki ætlaðar øllum næmingunum.

Í innihaldsyvirlitinum ber til at síggja, hvørjum málæruevni arbeitt verður við í hvørjum einstøkum parti.

*Vegleiðing* er skrivað í hvørjum heftinum sær



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

(í hesum heftinum á bls. 89). Í vegleiðingini verður greitt frá, hvussu høvundurin hevur hugsað sær, at arbeiðast kann við teimum ymisku síðunum, hvussu uppgávurnar kunnu loysast og í einstøkum førum, hví uppgávurnar eru júst soleiðis gjørdar og ikki øðrvísi.

Vónandi fara EG SKRIVI-bøkurnar at stuðla og eggja næmingunum at kunna seg væl og virðiliga um tað føroyska málið, her undir føroyska mállæru og rættskriving, so at næmingunum fellur lætt og raðið at orðbera seg á góðum og tíðarbærum føroyskum máli, bæði í talu og skrift.

*Høvundurin*



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

# Samspæl






Set *bókstavirnar*, sum koma *áðrenn* og *eftir* í bókstavaraðnum, rætt inn í talvuna!

| | | | |
|---|---|---|---|
| k | | | r |
| l | o | y | s |
| | ó | ý | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | k | | ø | p |
| a | l | l | a | r |
| á | | m | á | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| t | | ó | f | | ú |
| u | p | p | g | ā | v |
| | r | | | b | |

-

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| t | | m | | p |
| u | r | n | a | r |
| | s | | á | |

| | |
|---|---|
| n | |
| o | g |
| | h |

| | | | |
|---|---|---|---|
| e | | | m |
| f | i | n | n |
| | í | o | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | í | | | | t |
| f | j | a | l | d | u |
| g | | á | m | ð | |

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| ó | | r | s | | | m | ø | p |
| p | o | s | t | a | r | n | a | r |
| | ó | | | á | s | | á | |

Skriva orðini í ljósareyðu puntunum: loys allar uppgāvurnar

og finn fjaldu postarnar



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur




**1. postur!**

Til hesa uppgávuna skalt tú nýta fýra ymiskar litir: reytt, grønt, blátt og lilla!
Tú skalt byrja í einum av litaðu bókstavunum og fara tann veg, ið pílurin vísir. Tú skalt finna orð í ávísum orðaflokki. Tú kanst flyta teg allar vegir. Seinasti bókstavur í hvørjum orði er fyrsti bókstavur í næsta orðinum! Tá ið tú ert liðug/ur, hevur tú skrivað ein stóran bókstav í tí litinum, tú nýtir. Ger tað sama við hinar tríggjar litaðu bókstavirnar, men her eru orðini úr øðrum orðaflokkum.

Út frá loysnini sært tú, nær tú ert liðug/ur við hvønn orðaflokkin!

| | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| U | S | Á | L | I | K | Y | L | L | I | H | R | I | V | G | A | S | B | N | P | O | R |
| M | L | O | U | Y | R | I | T | S | U | T | A | G | S | R | U | L | K | B | V | S | A |
| M | A | K | L | U | D | V | B | I | R | L | N | T | A | T | U | L | Æ | U | I | O | D |
| A | N | A | S | N | M | O | T | G | D | A | N | Y | U | R | A | S | N | M | O | I | N |
| R | V | I | O | Ø | J | K | Y | U | S | B | E | V | B | I | Ó | S | A | E | T | Y | A |
| Ó | T | O | S | K | U | R | U | L | L | A | R | M | L | O | P | R | D | S | A | Y | K |
| E | J | Y | Æ | L | K | G | R | A | S | G | U | B | H | Y | R | K | A | S | D | R | K |
| E | R | G | H | V | B | T | Y | S | E | U | G | N | O | I | U | S | D | R | T | E | Ø |
| M | B | E | R | T | U | Ø | Æ | N | V | R | N | N | M | O | P | Á | S | K | O | N | R |
| S | E | G | H | M | A | S | L | Æ | T | K | O | Y | T | K | H | G | S | A | L | Y | I |
| A | J | L | Ó | S | Á | R | U | M | R | A | G | U | M | K | L | O | P | E | R | A | T |
| R | E | Y | T | T | U | N | G | U | R | E | Ð | A | N | Ú | T | Í | Ð | L | I | G | A |
| U | R | U | G | H | L | K | S | A | R | Y | I | V | B | Y | T | R | O | P | S | A | G |
| G | I | U | L | Æ | Ø | F | G | Y | T | T | N | T | Y | U | K | L | Æ | Ø | S | A | V |
| I | V | B | A | S | T | R | E | L | K | T | A | B | N | J | I | O | F | G | T | A | S |
| L | A | F | G | H | U | I | L | Æ | P | U | Ð | Y | U | T | R | O | P | Æ | L | B | N |
| A | R | E | S | D | H | U | Y | K | M | N | R | A | S | D | E | T | Y | M | N | E | R |
| N | R | E | B | N | M | K | O | Ó | Á | G | O | S | G | N | M | A | B | E | I | N | L |
| A | D | H | J | R | E | F | G | I | P | Í | N | D | E | N | U | O | K | L | E | V | E |
| V | Ø | D | R | E | N | B | A | T | S | R | A | B | J | U | L | Æ | T | R | E | Ó | I |
| R | Í | T | P | O | K | J | N | A | R | I | T | B | E | R | Y | K | J | L | O | P | Ð |
| Ø | J | Ð | N | U | R | U | N | Ø | R | G | F | A | M | A | S | D | L | Á | J | S | I |

1. postur er fjaldur við eina song Bókstavurin á postinum er M



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

## 2. postur!

Finn veg ígjøgnum villiniborgina! – Tú skalt bara fara hagar, ið tú møtir bundnum navnorðum!




Feilur í 3. posti!

...aman 3. bókstav í øllum orðunum, tú møtti!

Posturin er fjaldur við hurðina! Bókstavurin er Á

## 3. postur!

Finn orðini, sum koma aftaná í Orðaskyni, og set tey í bókstavarað í talvuna!







Set saman bókstavirnar í ljósareyðu puntunum!

Posturin er fjaldur við myndina! Bókstavurin er L



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

## 4. postur!

Finn umsøgn, grundlið og ávirki og set ávirkið í rætta raðfylgju í talvuna niðanfyri!

Drongurin sá eina kettu, sum sá so fitt út. So sá hann eisini ein frens, sum lá innan fyri hurðina. Ein gamal maður átti tey. Kettan hevði lagt tveir kettlingar. Teir lógu í eini kurv í kjallaranum. So sá drongurin ein hund koma rennandi. Hann hevði eitt bein í kjaftinum. Hetta var hundurin hjá tí gamla manninum. Hann sá frensin og fór yvir til hansara. Frensurin var glaður fyri vitjanina.



| | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | K | E | T | T | U | | | |
| | | | F | R | E | N | S | | | | | |
| | | | | | T | E | Y | | | | | |
| | | | K | E | T | T | L | I | N | G | A | R |
| | | | | H | U | N | D | | | | | |
| | | B | E | I | N | | | | | | | |
| F | R | E | N | S | I | N | | | | | | |

Set saman bókstavirnar í gulu puntunum!

Posturin er fjaldur undir kettuni! Bókstavurin er L

## 5. postur!

Finn lýsingarorð, sum týða tað øvugta, og set tey í talvuna!

| | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| lítil | | S | T | Ó | R | | | | | |
| vakurt | | | L | J | Ó | T | T | | | |
| villur | | | | S | P | A | K | U | R | |
| dovin | | | | R | A | S | K | U | R | |
| smalur | | | | B | R | E | I | Ð | U | R |
| heitur | | | | K | A | L | D | U | R | |
| tjúkk | | K | L | Ø | N | | | | | |
| lættur | T | U | N | G | U | R | | | | |
| svong | | | | | M | E | T | T | | |

Set saman bókstavirnar í gráu puntunum!

Posturin er fjaldur uppi yvir róparanum! Bókstavurin er Æ



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

**6. postur!**

Er undirstrikaða orðið vanligt navnorð, sernavn ella talorð! – Set ring um tað rætta!

| | navn-orð | ser-navn | tal-orð |
|---|---|---|---|
| Høgni býr í Sandavági | e | (á) | t |
| hann eigur eina systur | (h) | r | r |
| hon er trettan ár | r | t | (i) |
| tey ganga í skúla á Giljanesi | a | (m) | l |
| tey ganga í sjeynda flokki | s | a | (n) |
| í flokkinum eru sekstan næmingar | k | n | (u) |
| flokkurin er ikki av teimum størstu | (ø) | g | g |
| í flokkinum eru átta gentur og átta dreingir | (v) | u | t |
| í gjár var flokkurin útferð | (d) | s | a |
| tey vóru við Fjallavatn | u | (a) | r |
| hetta var fyrsta útferðin í ár | l | d | (m) |
| tey fóru við bussi til Vatnsoyrar | t | (n) | a |
| tey kendu væl bussføraran | (i) | i | s |
| hann býr í Miðvági | i | (n) | t |
| børnunum dámdi væl at sleppa útferð | (ð) | i | i |

Set saman bókstavirnar, tú hevur sett ring um. Tú skalt nýta eina ávísa raðfylgju!

Posturin er fjaldur oman fyri høvdið á manninum! Bókstavurin er R





© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

**7. postur!**

Finn sernøvn í kassanum og skriva tey eftir bókstavarað!

| | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| E | L | D | T | E | R | L | H | S | O | N | N | D |
| S | K | G | R | E | T | A | A | K | I | L | Æ | G |
| D | H | J | S | A | N | N | N | Á | Y | S | D | U |
| I | A | Ó | K | I | R | T | U | R | Ø | T | R | N |
| S | Ú | N | D | U | N | A | S | I | K | Y | U | N |
| U | R | L | V | O | J | Ó | N | F | R | Í | Ð | A |
| N | T | E | Ø | D | F | R | Ó | Ð | I | S | T | R |
| N | I | Y | R | D | B | J | O | B | S | Ø | L | G |
| V | L | G | V | U | L | K | S | D | T | T | Y | S |
| Á | Æ | H | K | R | I | S | T | I | A | N | O | T |

A: Ann F: Fróði G: Greta

G: Gunnar H: Hanus J: Jónfríð

J: Jónleyg K: Kári K: Krista

K: Kristian O: Oddur S: Sonni

S: Sunnvá S: Súni U: Una

Set saman bókstavirnar í gráu puntunum!

Posturin er fjaldur aftan fyri konuna! Bókstavurin er A

Set saman bókstavirnar í øllum postunum: M Á L L Æ R A





© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

# Størstur er kærleikin

**Frágreiðing:**

Øll røða, bæði munnlig og skrivlig, verður borin fram í setningum. Ein setningur er hugsan okkara, borin fram í orðum.
Tað er ikki nóg mikið at benda orðini rætt, tey mugu eisini bindast saman soleiðis, at tey sita væl og geva góða og greiða meining!

**Høvuðs- og eykasetningar:**

Setningur, ið einsamallur gevur fulla meining, nevna vit *høvuðssetning*,
og hann kann standa einsamallur!
Dømi: Hanna vaskaði upp
Setningur, sum er bundin at øðrum setningi fyri at geva betri frágreiðing, nevna vit *eykasetning*, men hann kann *ikki* standa einsamallur!
Dømi: tá ið eg kom inn

Vit býta høvuðssetningarnar sundur í 4 sløg:

| | |
|---|---|
| 1) søgusetningur: | hon vaskar |
| 2) spurnarsetningur: | hvør vaskar? |
| 3) hugssetningur: | lat hana heldur vaska! |
| 4) boðssetningur: | vaska nú – vaskið nú! |

Vit hava eisini 4 sløg av eykasetningum:

| | |
|---|---|
| 1) sagnareykasetningar: | byrja við *at* - eg sá, *at* hon kom |
| 2) spurnareykasetningar: | byrja við *hvat, hvar, hvør, hví* |
| 3) afturbeindir eykasetningar: | byrja við *ið* ella *sum* |
| 4) sambindingar eykasetningar: | siga nakað um *tíðina, staðið, orsøkina, ætlanina* ella *fylgjuna*. |
| a) tíðareykasetningar: | byrja við *tá ið, tá, nú ið, higar ið, meðan, áðrenn, sum, um, fyrr enn* |
| á) staðareykasetningar: | byrja við *har, har sum, her ið, her sum* |
| b) orsakareykasetningar: | byrja við *at, tí, tí at, av tí at, vegna tess* |
| d) ætlanareykasetningar: | byrja við *at, so at, til tess, fyri at* |
| e) fylgjueykasetningar: | byrja við *at, so at, so, tað at* |



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Vit spyrja *nær* fyri at finna tíðareykasetning, *hvar* fyri at finna staðareykasetning, *hví* fyri at finna orsakar- og ætlanareykasetning og *hvussu* fyri at finna fylgjueykasetning!

**Brot úr bókini „Regin og Sára" eftir Heina Hestoy**

Regin og Sára sótu uppi á kamarinum, tá ið telefonin ringdi. Hann fór niður og tók hana. Tað var Anna. Hon ljóðaði so undarlig, var so lágmælt, at hon næstan ikki hoyrdist.
–Er mamma tín inni? spurdi hon.
–Nei, hon kemur um ein tíma. Her eru bara Sára og eg. Hvat sigur tú?
Anna fekk næstan ikki orðið upp, tí hon var so illa við. Hon ynskti seg langt burtur, men her var einki at gera. Tað skuldi sigast. Henni hevði dámt betur at sagt tað við mammu Regin fyrst, men nú var bara at fáa tað fram.
Við skelvandi rødd segði hon frá øllum, sum var farið fram.
–Tú mást ikki vera illur, endaði hon við gráturødd, – men satt at siga helt eg ongantíð, at tú hevði gjørt tað; alt gekk so skjótt. Vit lupu kanska framav. Kanst tú ikki koma út til mín, so kunnu vit tosa um tað?

Set reyða striku undir høvuðssetningarnar og grøna striku undir eykasetningarnar.

**Frágreiðing:**
Ivast tú, ber í flestu førum til at seta *ikki* inn í setningin. Stendur tað aftan fyri umsøgnina, er setningurin høvuðssetningur, men stendur tað framman fyri umsøgnina, er setningurin eykasetningur.

Dømi: Hanna vaskaði upp, tá ið telefonin ringdi
x o x o

Hanna vaskaði *ikki* upp, (høvuðssetningur)
x o

tá ið telefonin *ikki* ringdi (eykasetningur)
x o

Hygg eftir setningunum, tú strikaði undir við grønum, tað er: eykasetningunum! – Hvørjum orði byrja teir við? Skriva orðini á regluna:

tá ið, at, tí, sum, at, so



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

ella men og bæði og

Hvat slag av eykasetningi eru eykasetningarnir á bls. 15?

1) tíðareykasetningur
2) sagnareykasetningur
3) orsakareykasetningur
4) afturbeindur eykasetningur
5) sagnareykasetningur
6) ætlanareykasetningur

**Frágreiðing!**
Sambindingarorð eru smáorð, sum binda saman orð, liðir og setningar!

| | | |
|---|---|---|
| Dømi: | drongurin og gentan | *og* bindur tvey navnorð saman |
| | syngja og spæla | *og* bindur tvey sagnorð saman |
| | hann syngur, men hon spælir | *men* bindur tveir setningar saman |

*Sambindingarorð*, ið binda tvey *javnsett orð* saman, eru t.d.: og, *bæði – og*, *antin – ella*, *ella*, *hvørki*, *hvørki – ella*, *annaðhvørt*, *men*

Set hóskandi sambindingarorð á tómu regluna!

Høgni __og__ Silja eru tvíburðar. Teimum dámar væl __bæði__ at spæla fótbólt __og__ flogbólt, men seinastu vikuna hava tey __hvørki__ spælt fótbólt __ella__ flogbólt, tí høllin hevur verið brúkt til eina sølustevnu.

Mamma __og__ pápi teirra hava hjálp til við sølustevnuni. Høgni __og__ Silja vóru í høllini __og__ hugdu. Høgni vildi fegin sleppa at hjálpa til á sølustevnuni, __men__ Silja hevði ikki serliga góðan hug til hetta arbeiðið. Mamman segði, at __antin__ hjálpti hon til, __ella__ fór hon til hús.

**Frágreiðing!**
Tey *sambindingarorð*, ið binda høvuðs- og eykasetningar saman, eru t.d.:
*at, tí at, av tí at, tá ið, til, fyrr enn, so, so at, um, sum, hóast, har ið, uttan*

at so HAR ið



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Set *hóskandi sambindingarorð* á ta tómu regluna!

Silja fór at hjálpa foreldrunum, hóast hon ikki tímdi so væl. Hon gjørdi tað, tí at hon ikki tímdi til hús, tá ið Høgni slapp at vera í høllini. Av tí at hon ikki var líka sterk sum Høgni, slapp hon at gera lættari arbeiði. Tey hjálptu til allan dagin, og Silja var ikki liðug, fyrr enn klokkan var níggju. Hóast Silja var móð, so bjóðaði hon seg til at koma aftur morgunin eftir.

Høgni var eitt sindur seinni liðugur enn hon, men hon bíðaði eftir honum, so at hon slapp undan at ganga einsamøll til hús. Hvørki mamman ella pápin vóru liðug, so at tey komu seinni. Tey máttu fyrst rudda og vaska høllina.

Tú fært tveir minuttir til hvørja av hesum trimum uppgávunum!
Hvørji navnorð ella sernøvn hugsar tú um, tá tú hoyrir orðið „kærleiki“?

Hvørji sagnorð setur tú í samband við orðið „kærleiki“?

Hvørjar kenslur setur tú í samband við orðið „kærleiki“?






© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Tú fært 10 minuttir til hesa uppgávuna!
Skriva eina søgu, sum snýr seg um kærleika!

**Kærleiki**

Set punktum í søguna!
Finn umsøgn, grundlið og set komma!
Set reyða striku undir høvuðssetningarnar og grøna striku undir eykasetningarnar.

Finn orð, sum byrja við *kær*-!

Finn orð, sum byrja við *for*-!



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur







# Harpuríma

**Brot úr Hørpurímu!**

1. Har komu tveir biðlar ríðandi í garð
-(eg) biði tygur renna –
bóðu moy, sum yngri var.
-Rúnarmenn, gerið tað mín jomfrú, eg biði tygur:
rennið, talið varliga við teir, rúnarmenn!

2. Ta yngru teir tá bóðu,
ta eldru teir forsvóru.

3. Tann yngra, hon er seg so fríð,
rætt sum sól um midsummarstíð.

4. Tann eldra hon er seg so ljót,
rætt sum ormar skríða á grót.

5. Tann yngra kann at spinna gull,
tann eldra er av svøvni full.

6. Tann yngra vevur gull í lað,
tann eldra svevur allan dag.

7. Tann yngra kann at spinna,
tann eldra ikki at tvinna.

8. Tann yngra kann at lesa lestur,
tann eldra ikki at seyma kveistur.

9. Systir talar til systur góð:
„Vit skulum okum í sævarflóð."

10. „Hvat skulum vit í sævarflóð gera?
vit hava ei tvinni silki at bera."

11. „Tað er so mangur í sævarflóð,
ið ikki eigur tvinni silki góð.

12. Vit tváum okkum hvítar,
vit eru tvær systrar líkar."

13. „Um tú tváar teg allan dag,
tú verður ei hvítari, enn Gud tær gav.

14. Um tú tváar teg hvíta sum fann,
tú fært ei mín festarmann."

15. Tær gingu seg til strandar,
steinur lá fyri landi.

16. Tann yngra setur seg upp á stein,
tann eldra førdi hana út á streym.

17. Hon rættir upp sína ljósu hond:
„Systir, systir, hjálp á land!"

18. „Eg hjálpi tær ei á land um sinn,
uttan eg fái biðil tín."

19. „Gjarna gevi eg alt, eg á,
á biðlinum havi eg einki ráð."

20. „Gjarna gevi eg tær bæði,
Biðil og brúðarklæði."

21. „Søkk nú, søkk nú, systir mín!
eg skal hava biðil tín."





© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur



[Set striku undir øll sagnorðini í Hørpurímu!
Finn umsøgn og grundlið!] ÷

**Frágreiðing:**

Umsagnirnar eru sagnorð. Sagnorð verða bend í hættum, tíðum, tali og persóni.
Vit hava hesar persónar:

| | **eintal:** | **fleirtal:** |
|---|---|---|
| 1. persónur: | eg | vit |
| 2. persónur | tú | tit |
| 3. persónur | hann, hon og tað | teir, tær, tey |

Í eintali broytist sagnorðið ofta alt eftir, hvør persónur er grundliður!

Být sagnorðini í Hørpurímu sundur soleiðis:

1. persónur í eintali nútíð:

| | | |
|---|---|---|
| eg hjálpi | gevi eg | havi eg |
| eg fái | eg á (eigi) | skal |

2. persónur í eintali nútíð:

| | | |
|---|---|---|
| tú tváar | tú verður | tú fært |

3. persónur í eintali nútíð:

| | | | |
|---|---|---|---|
| (hon) er | (tann yngra) kann | vevur | kann (ikki) |
| (hon) er | (tann eldra) er | svevur | (systir) talar |

3. persónur í fleirtali nútíð:

| | | |
|---|---|---|
| skulum gera | (vit) hava | skríða |
| tváum | (vit) eru | |

Í lýsingarhátti nútíð (-andi):

| |
|---|
| ríðandi |





© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur



Navnháttur:

| | | | |
|---|---|---|---|
| at spinna | at lesa | gera | hava |
| at tvinna | at seyma | at bera | renna |

Boðsháttur í eintali:

| | |
|---|---|
| søkk! | hjálp! |

Boðsháttur í fleirtali:

| | | |
|---|---|---|
| gerið | rennið | talið |

3. persónur í eintali tátíð:

| | | | |
|---|---|---|---|
| var | lá | førdi | (Gud tær) gav |

3. persónur í fleirtali tátíð:

| | | |
|---|---|---|
| komu | forsvóru | gingu |
| bóðu | | |

Bend hesi sagnorðini úr Hørpurímu:

ganga gera sova fáa tala seyma rætta hjálpa vera hava

| | eintal | | fleirtal | | | fleirtal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| navnháttur | 3.pers. nútíð | 3.pers. tátíð | tátíð | lýsingarh. í nútíð | lýsingarh. í tátíð | boðs-háttur |
| at bera | ber | bar | bóru | berandi | borið | berið |
| at ganga | gongur | gekk | gingu | gangandi | gingið | gangið |
| at gera | ger | gjørdi | gjørdu | gerandi | gjørt | gerið |
| at sova | svevur | svav | svóvu | sovandi | sovið | sovið |
| at fáa | fær | fekk | fingu | fáandi | fingið | fáið |
| at tala | talar | talaði | talaðu | talandi | talað | talið |
| at seyma | seymar | seymaði | seymaðu | seymandi | seymað | seymið |
| at rætta | rættir | rætti | rættu | rættandi | rættað | rættið |
| at hjálpa | hjálpir | hjálpti | hjálptu | hjálpandi | hjálpt | hjálpið |
| at vera | er | var | vóru | verandi | verið | verið |
| at hava | hevur | hevði | høvdu | havandi | havt | havið |

Hvussu eita somu sagnorð í 1. persóni í nútíð?

gangi, geri, sovi, fái, tali, seymi, rætti, hjálpi, eri, havi



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur



Set *-i* ella *-ið* ella *-ð* á strikurnar!

Eg búgv_i_ í Vík. Eg eit_i_ Ása og er_i_ 13 ár. Eg gang_i_ í 7. flokki, men av tí at vit eru so fá, so hava vit í ár ging_ið_ saman við teimum í 6. flokki. Eg far_i_ í morgin saman við hinum í flokkinum at arbeiða við evninum kvæði og rímur. Eg ætl_i_ mær at gera nógv við tað, tí eg havi altíð tíma_ð_ væl at arbeitt við ávísum evni. Seinastu árini hava vit kvøð_ið_ nakað, so hetta evnið er ikki heilt ókent.
Eg vænti, at eg verð_i_ skrivari í bólkinum. Eg sit_i_ ofta og skrivi, og eg droym_i_ um at gerast rithøvundur, tá eg verð_i_ vaksin. Eg havi ofta sit_ið_ og skriva_ð_ ymiskt, bæði søgur og tankar. Eg hald_i_ tað vera stuttligt at lesa mínar egnu tankar aftur. Eg skriv_i_ eisini dagbók. Eg havi skriva_ð_ dagbók, síðan eg gekk í triðja flokki. Eg les_i_ onkuntíð tað, sum eg havi skriva_ð_ fyrr. Tað er stuttligt at lesa, men ongin annar hevur lis_ið_ dagbókina. Hon hevur altíð lig_ið_ inni í mínum skápi, sum bert eg hav_i_ lykil til. Eg git_i_, at eg onkuntíð far_i_ at vísa systrum mínum hana, men ikki enn. Tær ganga í 5. og 6. flokki. Eg rokn_i_ við, at tær bara fara at flenna, um eg vís_i_ teimum dagbókina. Tær hava ongantíð sit_ið_ og skriva_ð_ sum eg. Onnur hevur altíð lis_ið_ nógv, men hin hevur hvørki tíma_ð_ væl at lis_ið_ ella skriva_ð_. Eg vænt_i_ tó, at tað verður seinni. Hon gongur bara í 5. flokki enn.

Les brotið úr Harpuríma aftur.
Skriva so brotið um til eina søgu. Søgan skal hava ein enda, sum tú finnur uppá!

**Harpuríma**



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

# Mín dagbók

Set punktum í søguna!
Finn umsøgn og grundlið og set komma!

**Frágreiðing:**

Í 9. ørindi í Hørpurímu hava vit hesa strofuna: Systir talar til systur góð. Hetta er gamaldags orðing, so sum ofta er í kvæðunum.

Orðið systir hoyrir upp í bólkin, vit nevna skyldskaparorð! Skyldskaparorðini eru hesi: faðir, móðir, systir, bróðir, dóttir, mostir og fastir. Sonur hoyrir ikki upp í skyldskaparorðini.
Felags fyri øll skyldskaparorðini uttan faðir er, at tey enda við *-ir* í hvørfalli eintali og *-ur* í hinum føllunum í eintali.

Í setninginum „Systir talar til systur góð", stendur *systir* í hvørfalli og *systur* í hvønnfalli!

Skyldskaparorðini bendast soleiðis:

| **eintal** | | | | |
|---|---|---|---|---|
| hvørfall | faðir | móðir | bróðir | mostir |
| hvønnfall | faðir | móður | bróður | mostur |
| hvørjumfall | faðir | móður | bróður | mostur |
| hvørsfall | faðirs | móður | bróður | mostur |
| **fleirtal** | | | | |
| hvørfall | fedrar | møður | brøður | mostrar |
| hvønnfall | fedrar | møður | brøður | mostrar |
| hvørjumfall | fedrum | møðrum | brøðrum | mostrum |
| hvørsfall | fedra | møðra | brøðra | mostra |

Set bróðir, dóttir, fastir og mostir inn í setningin í staðin fyri systir!

bróðir talar til bróður góðan.

dóttir talar til dóttur góða.

fastir talar til fastur góða.

mostir talar til mostur góða.





© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

# Vit arbeiða við kvæðum og rímum

Finn nøkur fjald navnorð, sagnorð, lýsingarorð og talorð og skriva tey upp eftir orðaflokki!



| | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| B | E | R | A | S | T | S | Æ | T | T | I |
| E | I | N | B | Á | T | U | R | Ó | S | A |
| B | R | E | Y | Ð | A | S | P | Æ | L | A |
| I | E | P | G | U | S | K | I | P | A | N |
| L | T | L | D | Y | K | U | T | R | Y | S |
| U | A | I | H | J | A | R | T | A | L | A |
| R | I | S | D | E | S | V | A | S | I | H |
| L | Í | T | I | L | Ó | Ð | U | R | E | Ø |
| T | V | I | N | N | I | G | Í | R | I | G |



Navnorð: bátur, rósa, breyð, skipan, hjarta, risi, bilur, epli, bygd, taska, kurv, ær, ýl

Sagnorð: bera, spæla, skipa, eta, sá, ansa, rósa

Lýsingarorð: lítil, óður, gírig, høg

Talorð: sætti, ein, trý, tvinni

Být nøkur av navnorðunum upp eftir kyni:

| **kallkyn** | **kvennkyn** | **hvørkikyn** |
|---|---|---|
| bátur | rósa - kurv | breyð |
| risi | skipan - ær | hjarta |
| bilur | bygd | epli |
| listi | taska | ýl |

Bend 2 kallkynsorð, 2 kvennkynsorð og 2 hvørkikynsorð omanfyri óbundin og bundin í hvørfalli eintali!

| **kallkyn** | | **kvennkyn** | | **hvørkikyn** | |
|---|---|---|---|---|---|
| **óbundið** | **bundið** | **óbundið** | **bundið** | **óbundið** | **bundið** |
| bátur | báturin | taska | taskan | skip | skipið |
| risi | risin | rósa | rósan | breyð | breyðið |
| bilur | bilurin | bygd | bygdin | hjarta | hjartað |



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Navnorð bendast óbundin og bundin í øllum føllum í eintali og fleirtali!
Vit fara at benda *bátur, taska og skip!*

| | **kallkyn** | | **kvennkyn** | | **hvørkikyn** | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | óbundið | bundið | óbundið | bundið | óbundið | bundið |
| **eintal** | | | | | | |
| hvørfall | bátur | bátur*in* | taska | task*an* | skip | skip*ið* |
| hvønnfall | bát | bát*in* | tasku | tasku*na* | skip | skip*ið* |
| hvørjumf. | báti | báti*num* | tasku | tasku*ni* | skipi | skipi*num* |
| hvørsfall | báts | báts*ins* | tasku | tasku*nnar* | skips | skips*ins* |
| **fleirtal** | | | | | | |
| hvørfall | bátar | bátar*nir* | taskur | taskur*nar* | skip | skip*ini* |
| hvønnfall | bátar | bátar*nar* | taskur | taskur*nar* | skip | skip*ini* |
| hvørjumf. | bátum | bátu*num* | taskum | tasku*num* | skipum | skipu*num* |
| hvørsfall | báta | báta*nna* | taska | taska*nna* | skipa | skipa*nna* |

**Frágreiðing!**
Bundin navnorð fáa, sum vit síggja í talvuni omanfyri, knýtt ending aftur at sær. Navnorð í hvørkikyni fáa endingina *-ð* ella *-ið* knýtta aftur at sær í hvør- og hvønnfalli eintali!
Kanna vit eftir kallkynsorðinum bátur, so eitur hann *báturin* í hvørfalli bundin og *bátin* í hvønnfalli.
Ivast tú í, um hvørkikynsorðið skal hava *-ð* ella ikki, ber til at seta eitt annað navnorð inn í staðin, t.d. bátur. Eitur tað báturin (hvørfall) ella bátin (hvønnfall), so skal hvørkikynsorðið hava *-ð*!

Dømi: *Lásið* var brotið.
*Báturin* var brotin.

Eg sá *skipið* koma inn eftir firðinum.
Eg sá *bátin* koma inn eftir firðinum.

Bókin lá í einum *skápi*.
Bókin lá í einum *báti*.





© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Endar orðið við *-i*, *-ð* ella *-ið*!

Tú kanst seta orðið *bátur* inn í staðin fyri hetta navnorðið. Verður bátur broytt til *báturin* ella *bátin*, so er orðið bundið í hvør- ella hvønnfalli og skal enda við *-ð* ella *-ið*!

Ása fer upp á skúlaloftið. Hon fer yvir til stóra skápið, tekur í lásið, men hurðin er læst. Hon tekur ein lykil, sum liggur á einum lítlum borði. Hon setur lykilin í lásið. Jú, hann passar, og hurðin fer upp. Skápið er á tremur av gomlum lutum. Eitt gamalt flagg stendur á ovastu hill. Hon tekur flaggið og setur tað á borðið. Flaggið hevði verið vakurt, um tað varð vaskað. Í skápinum eru eisini nógvar bøkur. Hon tekur nakrar bøkur av hillunum og leggur tær á gólvið. Gólvið er reint, so tær kunnu væl liggja har. Ása heldur, at hetta staðið ikki er serliga hóskandi til bókagoymslu, tí her kann eingin lesa bøkurnar, so hon ger av at taka tær við oman í skúlastovuna. Hon kann eisini taka tað lítla borðið oman við. Flaggið kann hon seta í vindeygað. Hon hugsar, um lærarin man vita, at bøkurnar og flaggið hava ligið í hesum skápi, men hon roknar við, at hann veit tað. Plássið í skúlastovuni er so mikið lítið, at hann hevur hildið tað vera best, um bøkurnar eru í onkrum skápi onkra aðrastaðni.
Tá Ása kemur oman við bókunum, sita hini og hyggja at einum landakorti. Tey hyggja at einum ávísum landi í Suðuramerika. Ása sær ikki, hvussu landið eitur, men tað liggur úti við havið. Kortið er stórt, men Ása hevur ring eygu. Annað eygað hevur altíð verið vánaligt, so hon plagar at brúka linsur, men í morgun hevði hon so ilt í eyganum, at hon tók brillurnar við, og tær liggja í einum hylki í taskuni.
Bókin, sum Ása leitaði eftir, var ein kvæðabók. Tey arbeiða við kvæðum, og hon ætlaði at finna eitt ávíst kvæði, sum tey einaferð hava lært uttanat, men sum ikki stóð í nakrari lesibók. Hon helt tí, at hon fór at finna hetta kvæðið, um hon fór upp á loftið at leita í kvæðabókunum.

Bend lýsingarorðini, tú fanst í kassanum á bls. 24, eftir kyni!

| kallkyn | kvennkyn | hvørkikyn |
| --- | --- | --- |
| lítil | lítil | lítið |
| óður | óð | ótt |
| gírigur | gírig | gírigt |
| høgur | høg | høgt |



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Stigbend lýsingarorðini í tí kyni, tey standa í í kassanum á bls. 24!

| grundstig | miðstig | hástig |
|---|---|---|
| lítil | minni | minst/ur |
| óður | óðari | óðastur |
| gírigur | gírigari | gírigastur |
| høg | hægri | hægst |

Bend fýra av sagnorðunum, tú fanst í kassanum á bls. 24, her:

| | eintal | | fleirtal | | fleirtal |
|---|---|---|---|---|---|
| navnháttur | 3. pers. í nútíð | 3. pers. í tátíð | tátíð | lýsingarh. í tátíð | boðsháttur |
| at bera | ber | bar | bóru | borið | berið |
| at rósa | rósar | rósaði/rósti | rósaðu/róstu | rósað | rósið |
| at spæla | spælir | spældi | spældu | spælt | spælið |
| at skipa | skipar | skipaði | skipaðu | skipað | skipið |

Být talorðini í grundtøl, raðtøl skiftistøl!

grundtøl: ein · trý

raðtøl: sætti skiftistøl: tvinni

Krossorðagáta

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| |  | hvørjum-fall av eg | smákykt í sjónum |  | d | |
| blóman | s | m | æ | r | a | n |
| dreingja-navn | p | e | t | u | r | |
| dreingja-navn | a | g | i |  | t | 2. persónur |
| aftan á m | n |  | tóni | | tveir líka bókstav. | t |
|  | n | á | l | í løtuni→ | n | ú |
| | tátíð av at renna | r | a | n | n | |



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur



# Tín besta kærleikssøga



**Fyrisøgn**

Ása situr og skrivar sína fyrstu kærleikssøgu. Hetta er ein søga sum hon er byrjað uppá í skúlanum men hon heldur tað vera eitt sindur torført at skriva um hetta evnið í skúlanum tí allir næmingarnir eru yngri enn hon. Ása er elsti næmingur í skúlanum í Vík. Umframt hana ganga tveir dreingir í 7. flokki. Øll hini í flokkinum ganga í 6. flokki. Har eru nakrar aðrar gentur men tær hugsa ikki so nógv um kærleika sum hon. Tí vil Ása fegin sjálv skriva hesa søguna. Hon lesur tað sum hon hevur skrivað og hon heldur søguna vera góða. Søgan snýr seg um eina 13 ára gamla gentu sum er góð við ein drong í flokkinum men drongurin hevur hug á eini aðrari gentu. Ása hevur gjørt hugarok um persónarnar, tíðina, staðið og søgugongdina, og hon veit longu, hvørjar hendingar skulu fara fram í søguni. Hon hevur tó enn ikki hugsað rættiliga um, hvussu søgan skal enda. Ása fer inn í kamarið, tí har stendur teldan. Hon setur seg við telduborðið og tendrar telduna, tí hon heldur tað vera best at skriva søguna beinleiðis inn á telduna. Ása dugir væl við teldu, so tað er nógv lættari fyri hana at bøta um søguna, um hon hevur hana á telduni.

Finn umsøgn og grundlið í fyrisøgnini frá reglu 1-10 og set komma!
Set grøna striku undir høvuðssetningarnar og reyða striku undir eykasetningarnar frá reglu 11-17!

Finn sagnorðini í fyrisøgnini, sum standa í 3. persóni í nútíð! Tey standa á hesum reglum: 1, 1, 1, 2, 7, 8, 8, 9, 12, 13, 14, 14, 14, 15 og 16

| | | |
|---|---|---|
| situr | skrivar | er |
| heldur | vil | lesur |
| heldur | snýr | er |
| veit | hevur | stendur |
| setur | tendrar | dugir |







© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur



Hvussu eita somu orð í tátíð?

| | | |
|---|---|---|
| sat | skrivaði | var |
| helt | vildi | las |
| helt | snúði | var |
| visti | hevði | stóð |
| setti | tendraði | dugdi |

**Frágreiðing!**
Sagnorð, sum enda við *-ti*, *-di*, *-ði* ella *-aði* í tátíð eintali, eru *veikt bend*, og sagnorð, sum *onga* ending hava í tátíð eintali, eru *sterkt bend*!

Bend fýra av veikt bendu sagnorðunum úr fyrisøgnini og fýra av sterkt bendu sagnorðunum og skriva tey í talvuna!

| navnháttur | nútíð eintal 3. pers | tátíð eintal | tátíð fleirtal | lýsingar-háttur í tátíð | boðsháttur í fleirtali |
|---|---|---|---|---|---|
| at skriva | skrivar | skrivaði | skrivaðu | hevur skrivað | skrivið |
| at vita | veit | visti | vistu | hevur vitað | vitið |
| at snúgva | snýr | snúði | snúðu | -„- snúð | snúgvið |
| at skula | skal | skuldi | skuldu | -„- skulað | |
| at tendra | tendrar | tendraði | tendraðu | -„- tendrað | tendrið |
| at sita | situr | sat | sótu | -„- sitið | sitið |
| at halda | heldur | helt | hildu | -„- hildið | haldið |
| at lesa | lesur | las | lósu | -„- lisið | lesið |
| at standa | stendur | stóð | stóðu | -„- staðið | standið |

Hvussu eita somu sagnorð í 1. persóni í nútíð?
Dømi: eg skrivi

| | | | |
|---|---|---|---|
| eg veit | eg skal | eg siti | eg lesi |
| eg snúgvi | eg tendri | eg haldi | eg standi |





© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Finn í fyrisøgnini 4 sagnorð, sum standa í lýsingarhátti í tátíð. Tey standa á reglu 2, 8, 11 og 13!

(er) byrjað (hevur) skrivað (hevur) gjørt (hevur) hugsað

Í fyrisøgnini eru 4 bundin navnorð í hvørkikyni. Tey standa á reglu 3, 11, 14 og 15! Skriva tey her:

evnið kamarið

staðið borðið

Finn 6 navnorð á reglu 11 og 12 og bend tey óbundin og bundin í hvørfalli eintali og fleirtali!

| eintal | | fleirtal | |
|---|---|---|---|
| óbundið ein/eitt | bundið hin/hitt | óbundið fleiri | bundið hinir/hinar/hini |
| eitt hugarok | hugarokið | hugarok | hugarokini |
| ein persónur | persónurin | persónar | persónarnir |
| eitt stað | staðið | støð | støðini |
| ein tíð | tíðin | tíðir | tíðirnar |
| ein søgugongd | søgugongdin | søgugongdir | søgugongdirnar |
| ein hending | hendingin | hendingar | hendingarnar |

Finn orð úr fyrisøgnini, ið týða tað øvugta og skriva tey tvær ferðir!

| | | | |
|---|---|---|---|
| síðstu | fyrstu | fyrstu | (1) |
| lætt | torført | torført | (3) |
| eldri | yngri | yngri | (4) |
| eingin | øll | øll | (5) |
| ringa | góða | góða | (9) |
| byrja | enda | enda | (13) |
| sløkkir | tendrar | tendrar | (15) |
| illa | væl | væl | (16) |
| torførari | léttari | léttari | (16) |







© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Verður orðið skrivað við *ð* ella *g*? – Set ring um tað rætta og skriva orðið!

| | ð | g | skriva orðið |
|---|---|---|---|
| sø g a | a | (s) | søga |
| a ð rar | (s) | v | aðrar |
| fe g in | t | (ø) | fegin |
| ta ð | (k) | o | tað |
| gó ð | (i) | l | góð |
| hu g | r | (g) | hug |
| sta ð ið | (e) | a | staðið |
| tí ð ina | (l) | g | tíðina |
| hu g arok | t | (a) | hugarok |
| vi ð | (r) | s | við |
| se g | t | (n) | seg |
| beinlei ð is | (æ) | u | beinleiðis |
| a ð rari | (k) | r | aðrari |

Set bókstavirnar, har tú setti ring um ð ella g, rætt saman, so fært tú eitt navnorð, sum hevur okkurt við henda partin at gera!

kærleikssøgan

Set orðini í rætt stað í talvuni og skriva tey á regluna!

dreingir tær nógv kærleika hvørjar allar ára snýr gentur telduna

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| á | r | a | | | | | |
| t | æ | r | | | | | |
| n | ó | g | v | | | | |
| s | n | ý | r | | | | |
| a | l | l | a | r | | | |
| g | e | n | t | u | r | | |
| h | v | ø | r | j | a | r | |
| t | e | l | d | u | n | a | |
| d | r | e | i | n | g | i | r |
| k | æ | r | l | e | i | k | a |

Ára
tær
nógv
snýr
allar
gentur
hvørjar
telduna
dreingir
kærleika



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

# Skrínið

Vit hava í hesum partinum arbeitt við:

- høvuðs- og eykasetningum
- sambindingarorðum
- skyldskaparorðum

Tú skalt nýta setningarnar niðan fyri talvuna til hesa uppgávuna!
Talið í talvuni sigur, hvønn setning tú skalt hyggja at, og orðaflokkurin undir talinum sigur, hvat orð í hesum setningi, tú skalt nýta!
Skriva rætta orðið í niðasta puntin í talvuni!

| 1 | 2 | 3 | 4 | 5 | 6 | 7 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| sernavn | sagnorð | talorð | hjáorð | lýsingar-orð | navnorð | fyriset-ingarlið |
| Høgnar | fiskaði | tríggjar | heilt | stórar | toskar | í gjár |

1. Høgnar er ein 13 ára gamal drongur.
2. Hann fiskaði við pápa sínum.
3. Bommpakkin kostaði tríggjar krónur.
4. Eg át eitt heilt stórt súrepli.
5. Eg sá tveir stórar hundar koma rennandi.
6. Høgnar fekk nakrar toskar.
7. Eg keypti mær eina fløgu í gjár.

Skriva setningin, tú setti niðast í talvuna, her:

Høgnar fiskaði tríggjar heilt stórar toskar í gjár.

Finn umsøgn, grundlið og ávirki!

Finn eisini umsøgn, grundlið og ávirki í teimum 7 setningunum omanfyri!



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Loys uppgávuna á sama hátt sum uppgávuna frammanfyri!

| 1 | 2 | 3 | 4 | 5 | 6 | 7 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| sernavn | sagnorð | navnorð | fyriset-ingarlið | sambind-ingarorð | fornavn | sagnorð í nútíð |
| Ása | skrivar | søguna | við hús | tí | hon | heldur |

| 8 | 9 | 10 | 11 | 12 | 13 | 14 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| sambind-ingarorð | navnorð | fyriset-ingarlið | sagnorð | hjáorð | lýsingar-orð | fyriseting |
| at | børnini | í flokkinum | eru | ov | ung | til |

| 15 |
|---|
| navnorð |
| søguna |

1. Ása skrivar eina søgu.
2. Hon skrivar um eina gentu og ein drong.
3. Ása er nøgd við søguna.
4. Hon situr við hús og skrivar.
5. Eg skundaði mær, tí mamma skuldi út.
6. Hon skuldi keypa.
7. Ása heldur søguna vera góða.
8. Eg haldi eisini, at søgan er góð.
9. Børnini skrivaðu stíl.
10. Øll í flokkinum skrivaðu stíl.
11. Tey eru ikki liðug enn.
12. Stílurin hjá Ásu er ov stuttur.
13. Mamma Ásu sigur, at Ása er ov ung at ganga úti um kvøldið.
14. Ása fer til vinkonu sína.
15. Hon vísir henni søguna.

Skriva setningin niðast í talvuni her og finn umsøgn, grundlið og set komma!

Ása skrivar søguna við hús, tí hon heldur,
at børnini í flokkinum eru ov ung til søguna



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Skriva høvuðssetningin úr talvuni her:

Ása skrivar søguna við hús,

Skriva eykasetningarnar her:

tí hon heldur,

at børnini í flokkinum eru ov ung til søguna

Hvat slag av eykasetningi eru hesir báðir eykasetningarnir?

1. orsakareykasetningur 2. sagnareykasetningur

Set grøna striku undir høvuðssetningarnar og reyða striku undir eykasetningarnar!

Ása var ov sein í skúla, tí hon hevði gloymt at seta vekjaraklokkuna at ringja. Hon setti seg niður og tók bókina fram. Lærarin spurdi hana, hví hon var ov sein. Ása segði, at hon hevði gloymt at seta klokkuna at ringja. Ása var kedd av, at hon kom ov seint í skúla. Hon var eisini illa fyri, tí hon ikki hevði etið morgunmat. Tá ið skúladagurin var av, fór Ása til hús at leggja seg. Hon læsti kamarsdyrnar, so eingin skuldi órógva hana. Hon sløkti eisini fartelefonina, tí hon visti, at besta vinkona hennara altíð plagdi at ringja til hennara aftan á skúlatíð.

Set bláa striku undir sambindingarorðini í brotinum omanfyri!

Set skyldskaparorðið í klombrum rætt inn á tómu regluna!

Systir mín spælir ofta við systur Ásu (systir). Systir Ásu er eitt ár eldri enn systir mín, men tær vita altíð okkurt at práta um (systir). Bróðir Ásu spælir eisini onkuntíð við yngra bróður (bróðir) mín, men teir klandrast ofta. Mostir mín býr í Havn (mostir) og fastir mín í Klaksvík (fastir). Eg plagi at vitja mostur (mostir) í summarfrítíðini og fastur (fastir) í heystfrítíðini. Dóttir (dóttir) mostur mína (mostir) er javngomul við meg, so vit plaga at fylgjast.



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

**Fyrisøgn!**

Eg eri nú næstan liðug við søguna. Kanska fari eg at lesa hana upp í skúlanum, men eg veit ikki, um eg tori, tí eg vænti, at hini fara at flenna.

Eg havi skrivað eina rættiliga kærleikssøgu og roynt at lýst kenslurnar gjølla.

Gentan í søguni grætur tí drongurin ið hon hevur hug á er góður við eina aðra. Hon er øvundsjúk inn á hina gentuna og ger ymiskt sum hon seinni angrar. Drongurin er í eini ringari støðu tí honum dámar báðar genturnar og vil ikki gera aðra kedda.

Eg veit ikki heilt hvussu endin á søguni skal vera men eg vil hava at endin skal vera góður. Eg havi lisið nakrar kærleikssøgur og mær dámar best søgur sum enda væl.

Eg havi eisini teknað nakrar myndir til søguna. Eg havi ikki litað tær enn, men tað fari eg at gera. Eg havi prentað søguna út og lagt hana í skriviheftið. Hóast eg ikki eri liðug enn, so ætli eg mær at vísa læraranum hana. Kanska hann kann hjálpa mær at bøta um tað, ið eg havi skrivað.

Verður søgan heilt góð, fari eg kanska at senda hana til Barnablaðið, men eg vil ikki hava, at navnið á mær skal standa undir søguni.

Finn umsøgn, grundlið og set komma í fyrisøgnina frá reglu 6 – 12!
Set grøna striku undir høvuðssetningarnar og reyða striku undir eykasetningarnar í sama broti!

Finn sagnorð í fyrisøgnini, sum standa í 1. persóni nútíð. Tey standa á 1., 1., 2., 2., 2., 4., 10. og 15. reglu!

eg eri — eg tori — eg vil
eg fari — eg vænti — eg ætli
eg veit — eg havi



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Finn sagnorðini í fyrisøgnini, sum standa í tátíðar lýsingarhátti. Tey standa á 4., 4., 11., 13., 13. og 14. reglu!

havi skrivað — havi lisið — havi litað

(havi) roynt — havi teknað — havi prentað

Verður orðið skrivað við æ ella a! – Set ring um tað rætta og skriva orðið!

| | æ | a | skriva orðið |
|---|---|---|---|
| næstan | (g) | s | næstan |
| vænti | (ú) | ø | vænti |
| fari | l | (k) | fari |
| rættiliga | (l) | s | rættiliga |
| hana | s | (i) | hana |
| kærleikssøga | (a) | l | kærleikssøga |
| grætur | (r) | t | grætur |
| aðra | t | (n) | aðra |
| ætli | (ø) | a | ætli |
| havi | v | (á) | havi |
| skal | i | (k) | skal |
| nakrar | l | (á) | nakrar |
| mær | (t) | r | mær |
| væl | (u) | t | væl |
| tað | t | (l) | tað |
| læraranum | (r) | u | læraranum |

Set saman bókstavirnar, har tú setti ring um æ: gularøtur

Set saman bókstavirnar, har tú setti ring um a: kinakāl

Skriva orðini í bókstavarað!

gjølla øvundsjúk navnið ið skriviheftið liðug angrar Barnablaðið

1. angrar
2. Barnablaðið
3. gjølla
4. ið
5. liðug
6. navnið
7. skriviheftið
8. øvundsjúk



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Finn fruktir í kassanum og skriva tær inn í orðagátuna!

| | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1t | R | I | S | K | A | P | P | I | L | S | I | N | A | T |
| 2 | S | Ú | R | E | P | L | I | V | A | R | K | Y | U | L |
| 3 | T | R | E | K | S | P | E | R | A | V | I | L | A | G |
| 4 | U | S | T | R | O | P | L | Æ | T | E | K | I | V | I |
| 1n | A | N | A | N | A | S | R | E | L | K | A | S | T | I |
| 5 | P | O | S | K | I | T | R | F | E | R | S | K | A | T |
| 6 | L | A | R | T | V | Í | N | D | R | Ú | V | U | R | L |
| 7 | S | I | N | A | P | R | I | K | O | S | A | A | K | T |
| 8 | B | I | T | Æ | G | R | O | S | I | N | A | L | M | A |
| 9 | D | U | N | N | A | B | L | O | M | M | A | F | E | R |
| 10 | A | P | A | S | V | I | S | K | A | R | Ø | D | A | R |
| 11 | M | O | N | A | F | I | K | A | L | A | S | S | E | R |




Skriva bókstavirnar í grønu puntunum her: PAÚALEKSKRA

Set teir rætt saman og fá eitt slag av køku omaná! SÚREPLAKAKA



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

# Merkisdagar og høgtíðir

Høgni og Silja fylla 14 ár í dag. Finn veg ígjøgnum báðar ballónirnar og vita, hvat tey bæði fáa í føðingardagsgávu, hvat tey fáa at eta, og hvat tey gera í føðingardegnum!
Í ballónini møtir tú ymiskum orðum. Set tey á rætta stað í talvuna niðanfyri!




| Skriva navnorðini, tú møtti í ballónini hjá Høgna, undir navnorð: | | Skriva navnorðini, tú møtti í ballónini hjá Silju, undir navnorð: | |
|---|---|---|---|
| lýsingarorð | navnorð | lýsingarorð | navnorð |
| smart | troyggja | rund | sápa |
| tjúkk | bók | nýggj | fløga |
| dýrur | pennur | bleytt | handklæð |
| heitir | handskar | stuttur | toppur |
| gott | teldupæl | vøkur | blusa |



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Set lýsingarorðini, tú møtti í villiniborgini, saman við teimum navnorðum, tey hóska til!
Hvat gera børnini í føðingardegnum? – Skriva øll sagnorðini, tú møtti í báðum villiniborgunum, her:

spæla | hyggja | eta
lurta | dansa | drekka

Set navnorðini, tú møtti í báðum villiniborgunum, eftir bókstavarað í talvuna!



| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| b | l | u | s | 2 a | | | | |
| b | ó | k | | | | | | |
| f | l | ø | 9 g | 10 a | | | | |
| h | a | 3 n | d | k | l | æ | ð | 7 i |
| h | a | 4 n | d | s | k | a | 6 r | |
| p | e | 8 n | n | u | r | | | |
| s | 5 á | p | a | | | | | |
| 1 t | e | l | d | u | s | p | æ | l |
| t | o | p | p | u | 11 r | | | |
| t | r | o | y | g | g | j | a | |



Set saman bókstavirnar frá 1-11. Høgni og Silja eru tannáringar

Bend sagnorðini, tú møtti í villiniborgunum í talvuna!

| | eintal | | fleirtal | | fleirtal |
|---|---|---|---|---|---|
| navnháttur | 3. persónur í nútíð | tátíð | | lýsingarh. í tátíð | boðsháttur í fleirtali |
| at drekka | drekkur | drakk | drukku | drukkið | drekkið |
| at spæla | spælir | spældi | spældu | spælt | spælið |
| at lurta | lurtar | lurtaði | lurtaðu | lurtað | lurtið |
| at hyggja | hyggur | hugdi | hugdu | hugt | hyggið |
| at eta | etur | át | ótu | etið | etið |
| at dansa | dansar | dansaði | dansaðu | dansað | dansið |

Hvussu eita somu sagnorð í 1. persóni í nútíð?

eg drekki - eg spæli - eg lurti - eg hyggi - eg eti - eg dansi



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Set sagnorðini úr villiniborgunum eftir bókstavarað í talvuna!



| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| d | a | [4] n | s | a | |
| d | r | e | k | k | [5] a |
| e | t | a | | | |
| [1] h | y | g | [3] g | j | a |
| l | [2] u | r | t | a | |
| s | p | æ | l | a | |



Set saman bókstavirnar frá 1-5. Børnini hugna sær í føðingardegnum.
Skriva lýsingarorðini úr villiniborgunum her í øllum kynum!

| kallkyn | kvennkyn | hvørkikyn |
|---|---|---|
| heitur | heit | heitt |
| smartur | smørt | smart |
| tjúkkur | tjúkk | tjúkt |
| dýrur | dýr | dýrt |
| góður | góð | gott |
| rundur | rund | runt |
| nýggjur | nýggj | nýtt |
| bleytur | bleyt | bleytt |
| stuttur | stutt | stutt |
| vakur | vøkur | vakurt |

Vel 6 av lýsingarorðunum og stigbend tey í kallkyni. Minst til, at lýsingarorð í kallkyni enda við *-ur* í hástigi!

| grundstig | miðstig | hástig |
|---|---|---|
| heitur | heitari | heitastur |
| smartur | smartari | smartastur |
| dýrur | dýrari | dýrastur |
| rundur | rundari | rundastur |
| nýggjur | nýggjari | nýggjastur |
| bleytur | bleytari | bleytastur |
| vakur | vakrari | vakrastur |



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Hvat fáa tey at eta og drekka í føðingardagnum? Finn fjaldan mat og drekka í kassanum og skriva tað í bókstavarað!



| | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| S | I | B | O | L | L | A | R | A | D |
| P | I | T | S | A | S | A | L | A | T |
| A | B | E | M | G | K | U | L | S | R |
| N | A | B | A | K | A | K | A | O | B |
| N | N | U | K | Ø | F | Ø | S | D | U |
| U | A | D | Ø | K | F | K | A | A | L |
| K | N | I | K | U | I | U | N | V | A |
| Ø | K | N | U | Í | S | M | J | A | E |
| K | Ø | G | R | L | E | A | U | T | R |
| U | K | S | E | R | T | N | Y | N | T |
| R | U | B | O | M | M | N | I | U | L |



Tvørturum:

b: bollar b: bomm í: ís

k: kakao p: pitsa s: salat

Niðureftir:

b: banankøku b: buding

k: kaffi k: køkumann

l: lagkøku l: lasanju

p: pannukøkur s: smákøkur

s: sodavatn t: te

Tú fært 3 minuttir til hesa uppgávuna!
Tú fyllir! – Hvat ynskir tú tær í føðingardagsgávu? – Skriva ynskislistan!





© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Tú fært tríggjar minuttir til hesa uppgávuna!
Vel tríggjar lutir av ynskislistanum og lýs teir! – Tú skalt hugsa um útsjónd, t.d. stødd, hædd og lit.
Tú skalt bara brúka lýsingarorð!

| | | |
|---|---|---|
| Dømi: | sjampo: | dýrt, vælangandi, gult |
| | bók: | tjúkk, góð, spennandi, stuttlig, drúgv |

**lutur:** **lýsing:**

Tú fært tríggjar minuttir til hesa uppgávuna!
Hvat fara tit at gera í tínum føðingardegi? – Skriva orð ella setningar!

Orð, ið siga okkurt um eitt virksemi ella eina gerð, eru sagnorð. Set striku undir sagnorðini omanfyri!
Tú skalt bjóða í tín føðingardag! – Hvør verður boðin?
Skriva nøvnini her:



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Ger tær innbjóðingarkort!

Finn fjaldar høgtíðir og merkisdagar og skriva teir á næstu síðu!

| | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| T | N | K | Y | N | D | L | L | S | M | E | S | S | A | M | K | I | P | O | G |
| O | O | P | L | S | D | G | R | Æ | K | A | R | I | S | M | E | S | S | A | U |
| L | R | R | A | J | Ó | L | A | A | F | T | A | N | A | S | B | E | R | T | L |
| L | Ð | Ó | R | E | P | I | O | Y | U | T | R | E | L | K | R | Ó | A | S | L |
| A | O | V | A | M | U | F | E | R | M | I | N | G | F | Y | U | L | G | S | B |
| K | Y | T | R | E | R | I | F | Ø | Ð | I | N | G | A | R | D | A | G | U | R |
| S | A | Ø | J | Ó | A | N | S | Ø | K | A | H | J | L | A | L | V | Ú | N | U |
| M | S | K | H | V | Í | T | U | S | U | N | N | A | R | R | E | S | T | D | D |
| E | T | A | F | R | H | J | P | Á | S | K | I | R | A | D | Y | Ø | F | A | L |
| S | E | S | I | L | V | U | R | B | R | Ú | D | L | E | Y | P | K | R | L | E |
| S | V | F | L | A | G | G | D | A | G | U | R | K | L | Æ | P | A | E | A | Y |
| A | N | L | K | J | A | F | Ø | S | T | U | L | Á | V | I | N | T | D | G | P |
| A | A | M | I | K | K | J | A | L | S | M | E | S | S | A | L | Æ | S | S | G |
| V | A | R | M | A | K | E | L | D | U | S | T | E | V | N | A | B | A | S | D |
| S | E | R | H | J | Æ | P | O | H | G | M | N | A | A | D | V | E | N | T | U |
| A | L | L | A | H | A | L | G | A | N | N | A | D | A | G | U | R | R | E | I |
| N | D | Ý | R | A | B | I | Ð | I | D | A | G | U | R | T | R | A | S | V | E |
| M | K | O | L | Æ | P | Á | S | V | E | S | T | A | N | S | T | E | V | N | A |
| V | E | R | D | S | T | Y | E | Y | S | T | A | N | S | T | E | V | N | A | D |



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Skriva her:

messur og søkur:

tollaksmessa, ólavsøka, kyndilsmessa, grækarismessa, jóansøka, mikkjalsmessa

stevnur:

norðoyastevna, sundalagsstevna, varmakeldustevna, vestanstevna, eystanstevna

høgtíðir og halgidagar:

jólaaftan, hvítusunna, páskir, føstuláviint, dýrabiðidagur

merkisdagar:

próvtøka, dópur, brúdleyp, gullbrúdleyp, ferming, føðingardagur, silvurbrúdleyp, flaggdagur, allahalgannadagur

Hygg í ein kalendara og vita, nær hesir dagar eru, og hvønn dag í viku, hesir dagarnir eru í ár!

| | dato | dagur |
|---|---|---|
| jólaaftan: | | |
| ólavsøka: | | |
| kyndilsmessa: | | |
| grækarismessa: | | |
| tollaksmessudagur: | | |
| flaggdagur: | | |
| dýrabiðidagur: | | |
| páskadagur: | | |
| hvítusunnudagur: | | |

Dagar og mánaðir verða skrivaðir við lítlum!







© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

# Bløð

**Aftursøgn**

Bløð ella dagbløð eru tíðindabløð, sum siga frá tí, sum er í samfelagnum. Summstaðni í verðini koma bløðini út hvønn einasta dag, aðrastaðni koma tey út eina ferð ella nakrar ferðir um vikuna. Tað merkir, at tað eru fólk, sum dag og nátt arbeiða, so at vit fáa lisið um alt tað nýggjasta, næstan beint sum tað hevur verið! Ofta eru tað politiskir flokkar, sum reka bløðini. Soleiðis fáa teir sett fram síni sjónarmið júst so, sum teir vilja hava tey at ljóða. Men bløð kunnu eisini vera óheft og lata øll sjónarmið koma framat. Nú á døgum eru bløðini vanliga politiskt óheft.

Í bløðunum ber til at lesa um politikk, búskap, ítrótt, móta og mangt, mangt annað.

Fyrsta føroyska blaðið var Færingetidende, sum kom út fyrstu ferð 13. mai 1852. Bara níggju ferðir kom blaðið út. 8. desember 1877 kom Dimmalætting út fyrstu ferð. Hesi bløðini vórðu øll skrivað á donskum máli. Í januar mánaði 1890 komu Føringatíðindi. Tey vóru fyrsta blað, sum varð skrivað á føroyskum máli.

Síðan ta tíð eru mong bløð komin afturat.

Set striku undir lyklaorðini í aftursøgnini. Tó í mesta lagi 15!
Skriva tey her:



______________________________

______________________________

______________________________

______________________________

______________________________

______________________________

Les aftursøgnina aftur, ella lærarin lesur hana fyri øllum flokkinum!

Skriva aftursøgnina, so sum tú minnist hana. Tú kanst nýta lyklaorðini til hjálpar at minna teg á tekstin, men tú skalt ikki hyggja í sjálvan tekstin!





© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

**Aftursøgn!**

Loys orðagátuna!




| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 - 5: | myrka | 4 - 6: | boðsháttur í eintali av at mala |
| 6 - 8: | tátíð av at lata | 7 - 8: | tátíð av at eita |
| 7 - 9: | vindrætningur | 8 - 9: | tvey eins hjáljóð |
| 9 - 12: | lutur - ella eitt stað, har avgerðir verða tiknar | | |

Set bókstavirnar frá 1-12 saman: dimmalætting



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

# Vit lesa eitt blað saman

**Fyrisøgn**

Høgnar, Beinta, Ása, Hanna, Silja og Høgni skulu í eina viku í starvsvenjing á Dimmalætting saman við tvíburunum Búgva og Tóka úr Havn. Hetta er ikki vanlig starvsvenjing sum tann í framhaldsdeildini, men eitt tilboð til nakrar 7. floks næmingar ymsastaðni úr Føroyum. Børnini fara at búgva saman í Havn, arbeiða saman og vera saman í frítíðini.

Á Dimmalætting fara tey at hyggja at, hvussu eitt blað verður gjørt. Tey skulu kanna eftir, hvat blaðfólkini skriva um, hvørjar spurningar tey seta, og hvønn tey spyrja. Tey fara eisini at hyggja at uppseting, yvirskriftum, teksti og myndum, og tey skulu somuleiðis hyggja at lýsingunum.

Ætlanin er so, at børnini sjálv skulu skriva onkra greinina, og at tey skulu kunna standa fyri eini blaðútgávu, tá ið tey koma aftur á sín skúla.

Børnini fara at búgva saman í eini íbúð á Ternuryggi saman við tveimum lærarum, Jóhonnu og Símuni, sum vanliga starvast á Venjingarskúlanum í Havn. Børnini og lærararnir hava avtalað at hittast á Farstøðini sunnukvøldið kl. hálvgum níggju, tí at tá kemur ferjan úr Suðuroynni.

Set tøl frá 1 - 8 aftan fyri orðini, soleiðis at tey verða skipað eftir bókstavarað, og skriva so orðini í bókstavarað!

tvíburunum 7 tilboð 6 arbeiða 1 frítíðini 3

Suðuroy 5 blað 2 verður 8 íbúð 4

1. arbeiða
2. blað
3. frítíðini
4. íbúð
5. Suðuroy
6. tilboð
7. tvíburunum
8. verður







© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Verður orðið skrivað við i ella y! – Set ring um tað rætta og skriva orðið!

| | i | y | skriva orðið |
|---|---|---|---|
| v i ka | g | a | vika |
| m y ndum | e | l | myndum |
| t i lboð | r | s | tilboð |
| sp y rja | i | ý | spyrja |
| h y ggja | s | s | hyggja |
| D i mmalætting | e | t | Dimmalætting |
| y virskrift | l | i | yvirskrift |
| f y ri | t | n | fyri |
| Ternur y ggi | r | g | Ternuryggi |
| h i ttast | i | u | hittast |
| ikk i | n | r | ikki |



Set saman bókstavirnar, har tú setti ring um i: grein og y: lýsing

Finn øll sernøvnini í fyrisøgnini. – Tey eru 17 í tali!

Høgnar, Beinta, Ása, Hanna, Silja, Høgni, Dimmalætting, Búgva, Tóka, Havn, Føroyum, Ternuryggi, Jóhonnu, Símuni, Farstøðini, Suðuroynni, Venjingarskúlanum



Til hesa uppgávuna skalt tú nýta Heimsatlas!
Hvørjum bygdum koyra hesi børnini framvið á veg til Havnar?

Hanna (úr Fuglafirði): __________

Høgnar (úr Vági): __________

Silja og Høgni (úr Sandavági): __________

Hygg í ferðaætlanina! – Nær skulu tey fara frá húsum, so tey eru í Havn kl. 20.30?

Beinta (úr Klaksvík): __________
Ása (úr Haldórsvík): __________
Høgnar (úr Vági): __________
Hanna (úr Fuglafirði): __________
Silja og Høgni (úr Sandavági): __________



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

**Frágreiðing:**

Fornøvn verða nýtt í staðin fyri onnur orð, ofta navnorð ella sernøvn!
Vit í yvirskriftini „Vit lesa eitt blað saman“ er eitt persónsfornavn, sum stendur í 1. persóni í fleirtali!

Persónsfornøvnini eru hesi:

| | **eintal** | **fleirtal** |
|---|---|---|
| 1. persónur | eg | vit |
| 2. persónur | tú | tit |
| 3. persónur | hann, hon, tað | tey |



Persónsfornøvnini verða bend í føllum!

| | **1. persónur** | **2. persónur** | **3. persónur** | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **eintal** | | | | | |
| hvørfall | eg | tú | hann | hon | tað |
| hvønnfall | meg | teg | hann | hana | tað |
| hvørjumfall | mær | tær | honum | henni | tí |
| hvørsfall | mín | tín | hansara | hennara | tess |
| **fleirtal** | | | | | |
| hvørfall | vit | tit | teir | tær | tey |
| hvønnfall | okkum | tykkum | teir | tær | tey |
| hvørjumfall | okkum | tykkum | teimum | teimum | teimum |
| hvørsfall | okkara | tykkara | teirra | teirra | teirra |

Set persónsfornøvn rætt á tær tómu reglurnar!

Eg fari til Havnar í eina viku. Eg gleði meg, tí eg skal vera í starvsvenjing á Dimmalætting. Vit eru 8 børn ymsastaðni úr Føroyum. Eg kenni ein av dreingjunum. Hann býr í Sandavági. Eg møtti honum á eini legu í Vatnsoyrum. Hann eigur eina tvíburasystur. Hon eitur Silja, men eg kenni hana ikki. Tey koma bæði til Havnar í starvsvenjing. Vit skulu øll búgva í eini íbúð á Ternuryggi. Tveir lærarar skulu búgva saman við okkum.
Teir arbeiða á Venjingarskúlanum. Eg gleði meg at hitta tey bæði. Eg havi



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

ikki møtt teimum fyrr, men mamma kennir Jóhonnu. Hon heldur hana vera fitta. Eg vóni ikki, at tey eru ov strong, so vit ikki sleppa út, tí eg vil so fegin sleppa oman í býin ein túr. Eg vænti, at vit fara í biograf og kanska út at eta.

Persónsfornøvn í eintali ávirka, hvussu sagnorðini verða bend!

| | | | |
|---|---|---|---|
| Dømi: | eg skrivi | tú skrivar | hann skrivar |
| | eg fari | tú fert | hon fer |

Bend hesi sagnorð í 1., 2. og 3. persóni í nútíð:




| **1. persónur** | **2. persónur** | **3. persónur** |
|---|---|---|
| eg veit | tú veitst | hann veit |
| eg geri | tú gert | hann ger |
| eg dugi | tú dugir | hann dugir |
| eg beri | tú bert | hann ber |

**Frágreiðing:**

Ávísingarfornøvn verða nýtt, tá ið víst verður á okkurt!

Ávísingarfornøvnini eru: tann hin hesin hasin

Tann bendist soleiðis:

| | **kallkyn** | **kvennkyn** | **hvørkikyn** |
|---|---|---|---|
| **eintal** | | | |
| hvørfall | tann | tann | tað |
| hvønnfall | tann | ta | tað |
| hvørjumfall | tí | teirri/tí | tí |
| hvørsfall | tess | teirrar | tess |
| **fleirtal** | | | |
| hvørfall | teir | tær | tey |
| hvønnfall | teir | tær | tey |
| hvørjumfall | teimum | teimum | teimum |
| hvørsfall | teirra | teirra | teirra |



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

**Frágreiðing:**

*Tað* endar næstan altíð við *-ð*, uttan tá tað er eitt ávísingarfornavn í kvennkyni hvønnfalli, t.e. tá tað knýtir seg at einum kvennkynsorði – Hygg í talvuna!

Dømi: Eg sá *ta* gomlu *konuna*.
Eg kom til *ta* lítlu *bygdina*.

Set *tað* ella *ta* á tær tómu reglurnar!

Tað regnar. Tað hevur regnað í allan dag. Eg vóni, at tað skjótt fer at slíta í. Eg tók tað bláa regnskjólið við mær út. Mamma bað meg fara í ta bláu skjúrtuna, men eg tímdi ikki í hana. Eg fór heldur í ta grønu blusuna. Tað er gott at hava nógv klæði at velja í. Í gjár sá eg ta fittu gentuna, sum eg havi so góðan hug á. Hon hevur tað vakrasta hárið, eg nakrantíð havi sæð. Tað er reydligt og purlut. Tað er ikki so løgið, at allir dreingirnir fjeppast uppi í henni.
Eg tók ta svørtu taskuna við mær í skúla. Í henni havi eg tað svarta penalarhúsið. Eg legði eisini nakrar góðar fløgur í taskuna, m.a. ta nýggjastu fløguna hjá mínum yndisbólki. Tað fer helst at verða væl dámt av mínum floksfeløgum.
So fari eg kanska at royna at lokka ta fittu gentuna inn í okkara flokshøli í fríkorterinum, so hon eisini kann sleppa at hoyra ta góðu fløguna.

Hvørjum falli stendur tað undirstrikaða fornavni í!

| | |
|---|---|
| Eg sá gentuna koma. | hvørfalli |
| Eg spurdi hana, um hon kom inn í okkara stovu. | hvønnfalli |
| Hon segði ja. | hvørfalli |
| Eg setti meg niður. | hvønnfalli |
| Hon setti seg hjá mær. | hvørjumfalli |
| Eg hugdi upp á ta vøkru gentuna. | hvønnfalli |
| Hon hugdi eisini upp á meg og smíltist. | hvønnfalli |
| Tað kendist frálíkt at sita undir liðini á henni. | hvørjumfalli |

HVØR HVØNN hvørjum HVØRS



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

# Yrkisbókmentir

**Frágreiðing:**
Yrkisbókmentir eru tekstir, sum snúgva seg um veruleikan, og fagurbókmentir eru søgur ella annað, sum alt er íspunnið!

Být hesar bøkur og tíðarrit sundur í yrkisbókmentir og fagurbókmentir!




Skriva bøkurnar í bókstavarað!

Yrkisbókmentir:

Fiskar
Føroya flora
Føroya jarðfrøði
heimsatlas
Heimsins lond

Heimur okkara · Alfrøði
Mannakroppurin
Søgufrøði

Fagurbókmentir:

7 dagar í helviti
Harry Potter
Hvør fjalir seg í...
Mannjagstran
Pippi

Regin og Sára
Salmiakk og spøkl
Oyggin í havinum



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

**Frágreiðing:**

Orðið yrkisbókmentir er samansett navnorð, sett saman av navnorðunum yrki og bókmentir.
Navnorð verða sett saman við stovnsbinding ella hvørsfalsbinding.
Í stovnsbindingini setur tú stovnin á fyrra navnorðinum saman við seinna navnorðinum.
Dømi: fjall + maður = fjallmaður
Í hvørsfalsbinding setur tú hvørsfalli av fyrra navnorðinum saman við seinna navnorðinum.

Dømi: bátur + maður = bát*s*maður

Set navnorðini saman og set ring um stovnsbinding ella hvørsfalsbinding!

| | | | stovnsbinding | hvørsfalsbinding |
|---|---|---|---|---|
| lampa + skermur | = | lampuskermur | l | (t) |
| regn + skjól | = | regnskjól | (k) | s |
| summar + frítíð | = | summarfrítíð | (a) | h |
| bátur + manning | = | bátsmanning | v | (e) |
| kaffi + koppur | = | kaffikoppur | (f) | ø |
| fótur + bóltur | = | fótbóltur | (f) | k |
| sól + brillur | = | sólbrillur | (i) | f |
| skip + manning | = | skipsmanning | f | (l) |
| toy + klemma | = | toyklemma | (s) | t |
| hestur + vognur | = | hestavognur | l | (d) |
| dukka + hús | = | dukkuhús | æ | (u) |
| fløga + spælari | = | fløguspælari | s | (k) |
| te + kanna | = | tekanna | (t) | r |
| telda + borð | = | telduborð | d | (a) |
| hond + bóltur | = | hondbóltur | (o) | d |
| bilur + hús | = | bilhús | (v) | e |
| hús + smiður | = | húsasmiður | t | (f) |
| bóltur + spæl | = | bóltspæl | (a) | k |
| lummi + lykt | = | lummalykt | j | (é) |

Set bókstavirnar saman har tú hevur sett ring um stovnsbinding og hvørsfalsbinding, so fært tú tvey samansett navnorð :

kaffistova og teldukafé



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Finn fjaldar yrkisbókmentir!

| | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| F | L | Y | T | I | F | U | G | L | A | R | T | O | L | I |
| Ø | M | A | N | N | A | K | R | O | P | P | U | R | I | N |
| R | O | L | Á | S | A | E | R | R | O | P | K | H | T | F |
| O | N | F | L | F | E | R | I | Ð | A | S | G | E | F | R |
| Y | Ð | R | M | O | P | E | R | A | L | Æ | Ó | I | L | Ó |
| S | U | A | A | S | A | V | B | F | I | O | Ð | L | O | Ð |
| K | L | Ð | N | E | R | Y | T | A | R | T | A | S | R | S |
| B | S | I | A | E | R | F | G | R | Ø | M | R | U | A | K |
| A | V | N | K | I | T | R | A | S | T | E | A | K | L | A |
| R | Í | O | K | I | U | S | L | Æ | N | B | Ð | O | V | P |
| N | H | E | I | M | S | A | T | L | A | S | Ø | S | S | A |
| A | B | N | N | R | E | O | Í | T | R | Ó | T | T | U | R |
| S | F | L | A | G | G | S | Ø | G | A | N | E | U | S | R |
| P | I | O | R | F | Ó | T | B | Ó | L | T | U | R | Y | Í |
| Ø | S | T | R | Í | Ð | S | Á | R | I | N | I | A | S | T |
| L | T | E | L | E | F | O | N | B | Ó | K | I | N | T | E |

Skriva tær í bókstavarað:

Á: Álmanakkin

F: Flytifuglar

F: Føroysk Barnaspøl

H: Heilsukostur

L: Litflora

M: Mondul

S: Stríðsárini

F: Flaggsøgan

F: Fróðskaparrit

G: Góðaráð

H: Heimsatlas

M: Mannakroppurin

O: Orðafar

T: Telefonbókin







© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

# Yrkistekstir í einum blaði

**Fyrisøgn**

Børnini komu í øllum góðum til Havnar sunnukvøldið. Á Farstøðini hittu tey tvíburarnar og báðar lærararnar, sum skulu taka sær av teimum hesa vikuna. Tey fóru niðan á Ternurygg, har tey fingu ein bita at eta. Aftaná fingu tey eitt sindur at vita um arbeiðið komandi vikuna.

Børnini hava nú verið á Dimmalætting í ein dag. Tey hava sæð, hvussu eitt blað verður gjørt, og tey hava saman við báðum lærarunum kannað, hvørjir tekstir eru í einum blaði. Komandi dagarnar skulu tey sjálv skriva tekstir til blaðið.

Silja og Tóki skulu gera eitt ummæli av einum filmi, sum gongur í Havnar Bio, og skriva eina grein um, hvat ungfólk í Havn takast við eftir skúlatíð.

Høgnar og Hanna skulu skriva eina frásøgn frá onkrari ítróttahending. Tey hava tosað um at skriva um ein fótbóltsdyst, antin í gentu- ella í dreingjadeildini. Tey hava verið og kannað, hvørjir dystir verða spældir í Gundadali, og tey hava funnið útav, at dreingjaliðini hjá HB og NSÍ spæla mikukvøldið, og gentur 14-17 ár hjá B36 og Víkingi spæla hóskvøldið.

Ása og Høgni skulu skriva eina grein um Gomlu Havnina. Teimum dámar báðum væl søgu og hava bæði lisið nógv um hetta evnið. Tey hava hugsað um at gera eina myndafrásøgn.

Beinta og Búgvi skulu skriva bókaummæli. Beinta hevur júst lisið „Oyggin í havinum“ og Búgvi „Brennivargurin“, so tey fara at ummæla hesar báðar. Tey fara á Býarbókasavnið í kvøld at læna bøkurnar, so ummælini verða skrivað so skjótt sum gjørligt.

Finn í fyrisøgnini 6 samansett navnorð!

| | |
|---|---|
| ítróttahending | fótbóltsdyst |
| dreingjadeildini | myndafrásøgn |
| bókaummæli | Býarbókasavnið |





© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Finn 11 sagnorð, sum standa í lýsingarhátti í tátíð! Tey standa á 6., 6., 7., 8., 14., 15., 15., 16., 20., 21. og 25. reglu.

| | | |
|---|---|---|
| hava verið | hava tosað | hava lisið |
| hava sæð | hava verið | hava hugsað |
| verður gjørt | hava kannað | verða skrivað |
| hava kannað | hava funnið | |

Finn í fyrisøgnini 5 bundin navnorð í hvørkikyni! Tey standa á 1., 4., 9., 17. og 20. reglu.

| | | |
|---|---|---|
| sunnukvøldið | arbeiðið | blaðið |
| mikukvøldið | evnið | |

Finn í fyrisøgnini 22 sernøvn!

| | | |
|---|---|---|
| Havnar | Høgnar | Ása |
| Farstøðini | Hanna | Høgni |
| Ternurygg | Gundadali | Gomlu Havnina |
| Dimmalætting | HB | Beinta |
| Silja | NSÍ | Búgvi |
| Tóki | B36 | „Oyggin í havinum" |
| Havnar Bio | Víkingi | „Brennivargurin" |
| Býarbókasavnið | | |

Finn tað øvugta av hesum orðum í fyrisøgnini, og skriva tað orðið tvær ferðir!

| | | | |
|---|---|---|---|
| ongum | øllum | øllum | (1) |
| ringum | góðum | góðum | (1) |
| oman | niðan | niðan | (3) |
| hvørgum | báðum | báðum | (7) |
| áðrenn | eftir | eftir | (12) |
| illa | væl | væl | (20) |





© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

## Krossorðagáta

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| |  |  | aftan á m | tvey ymisk hjáljóð | teksta-slag | fylgjandi bókstavir |
|  | h | u | n | d | u | r |
| fyriseting → | ú | r | boðgev-ing | s | m | s |
| felags-skapur / sambind. | s | t | tað sama sum vigaði | | m | aftan á p |
| a | fyriseting | a | v | djór → / grønt og gult | æ | r |
| t | dreingja-navn → / sjúka | p | á | l | l | gentu-navn |
| á / besta tíð ↳ | p | o | trý eins sjálvljóð | i | i | i |
| m | e | t | aftan á s / trý eins hjáljóð | t | aftan á b / áðrenn l | d |
| koyra burtur | s | t | r | i | k | a |
| tað øvugta av vát | t | u | r | r | aftan á k | 2. bók-stavur |
| | tvey eins hjáljóð | r | r | tátíð av at liggja | l | á |



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

# Hvat stendur í einum blaði?

**Frágreiðing:**

Vit seta ymisk tekn í skrivaðan tekst, so at hann verður lættari at skilja. Yvirskriftin „Hvat stendur í einum blaði?“ er ein spurningur. So at øll skilja tað, seta vit eitt spurnartekn aftan fyri tekstin. Vanligastu teknini eru hesi:

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| punktum | komma | kolon | gásareygu | spurnartekn | rópitekin | |

*Rópitekn* verður sett eftir boðs- ella ynskissetningar!

Dømi: Gott vikuskifti!
Lat hurðina aftur!

*Kolon* verður sett framman fyri beinleiðis ella hugsaða talu, og *gásareygu* verða sett um tað, sum sagt verður!

Dømi: Hann segði: „Eg komi í morgin.“
Ég hugsaði við mær sjálvari: „Nú er spælið tapt.“

Set 8 punktum í tekstin. Finn so umsøgn og grundlið og set komma!

Silja og Tóki vóru í biograf mánakvøldið tey sóu ein kærleiksfilm sum júst er komin til landið filmurin er spildurnýggjur tey vóru til frumframsýningina øll atgongumerkini vóru seld men tey bæði sluppu inn ókeypis tí at tey skuldu ummæla filmin
Silja og Tóki eru samd um at filmurin var góður Silja var fleiri ferðir um at fara at gráta men Tóki sigur at hann ikki hevur felt eitt einasta tárið
nú skulu tey bæði ummæla filmin og tað halda tey vera eitt sindur torført tey ætla at byrja við at siga eitt sindur um hvat filmurin snýr seg um og síðan fara tey at siga sína meining um tað ið tey halda vera gott og vánaligt við filminum.



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Set orðini framman fyri punktum í talvuna í somu raðfylgju sum í tekstinum!

| | | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| m | á | n | a | k | v | ø | l | d | 2 i | ð | | | | | | |
| 3 l | a | n | d | i | ð | | | | | | | | | | | |
| s | p | i | l | d | u | r | 8 n | ý | g | g | j | u | r | | | |
| 1 f | r | u | m | f | r | a | m | s | ý | n | i | n | g | i | n | a |
| f | i | l | 4 m | i | n | | | | | | | | | | | |
| g | ó | ð | 5 u | r | | | | | | | | | | | | |
| t | á | r | 7 i | ð | | | | | | | | | | | | |
| t | o | r | f | ø | 6 r | t | | | | | | | | | | |

Set bókstavirnar í gráu puntunum rætt saman: filmurin

Skriva fyrsta orðið eftir komma í talvuna, – set x við, um setningurin er høvuðssetningur ella eykasetningur og skriva, hvat slag av eykasetningi talan er um í eykasetningunum!

| fyrsta orðið í setninginum | høvuðssetn-ingur | eykasetn-ingur | slag av eykasetningi |
|---|---|---|---|
| sum | | x | afturbeindur |
| men | X | | |
| tí | | x | orsakar |
| men | X | | |
| og | | X | sambindingar |
| hvat | | X | spurnar |
| og | | X | sambindingar |
| ið | | X | afturbeindur |
| at | | X | sagnar |
| at | | X | sagnar |





© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Set tekn í tekstin niðanfyri!
Í tekstinum eru 7 punktum og 13 komma.
Set eisini kolon og gásareygu, har beinleiðis tala er, rópitekn eftir boðssetning og spurnartekn eftir spurning!

s t g f j l
Høgnar og Hanna fara at hyggja eftir fótbólti Tað er ein dystur millum
l t r s d f l æ g ó
genturnar hjá B36 og Víkingi Áðrenn tey fóru segði Høgnar við Honnu Eg haldi at
s e b m a d á r
vit skulu hava eitt kort við sum vísir at vit arbeiða á Dimmalætting Hví
s ð l s a v l r ø s r
skulu vit tað spurdi Hanna Tí so sleppa vit ókeypis inn svaraði Høgnar Tað er
s a s l m y p g
ikki neyðugt helt Hanna tí barna- og ungdómsdystir eru altíð ókeypis
í g j p f o e v k a
Koma tit ikki ein túr við spurdi Hanna hini men tey høvdu úr at gera og
f n k ð i t l i
kundu ikki koma Hugnið tykkum segði Búgvi tá tey fóru og Høgnar og
d j v i h
Hanna svaraðu sum við ein munn Hugnið tykkum somuleiðis

Set saman bókstavirnar oman fyri orðini framman fyri punktum og komma, so fært tú tvey orð, sum hava okkurt samband við fótbólt!

frásøgn dómaraseðil

Set seinasta orðið í gásareygunum inn í talvuna í bókstavarað!

| | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| D | i | m | m | a | l | æ | t | t | i | n | g |
| i | n | n | | | | | | | | | |
| n | e | y | ð | u | g | t | | | | | |
| ó | k | e | y | p | i | s | | | | | |
| s | o | m | u | l | e | i | ð | i | s | | |
| t | a | ð | | | | | | | | | |
| t | y | k | k | u | m | | | | | | |
| v | i | ð | | | | | | | | | |





© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Finn 12 villur á myndini høgrumegin!





Skriva villurnar her:

| | | | |
|---|---|---|---|
| flagg | genta | fløska | bóltur |
| linjuverji | drongur | ur | bein |
| tal | fótbóltskógvur | koppur | maður |



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

# Samskifti

Høgnar skal biðja Silju koma í biograf. Hann skal siga henni, hvør filmur gongur, hvar hann gongur, og nær hann byrjar. Tey skulu eisini gera eina avtalu um at hittast.

Tú fært 10 minuttir til hesa uppgávuna!
Ger tekstirnar til telefonsamrøðuna, sms-boðini, teldubrævið og kjattið!
Tú skalt skriva samrøðuna ímillum Høgnar og Silju, so at bæði skilja boðini!







© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur







Skriva kjattið millum Høgnar og Silju!



Skriva teldubrævið hjá Høgnar til Silju.



Skriva svarið hjá Silju.

Tú skalt avtala okkurt við besta vinmann tín ella bestu vinkonu tína.

Hvønn samskiftismøguleika velur tú? ________________________

Skriva samskiftið tykkara millum!









© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Foreldur tíni skuldu, tá ið tey vóru ung, gera eina avtalu uttan at hittast. Hvønn samskiftismøguleika heldur tú, tey nýttu? ____________________

Skriva samskiftið her:







Omma og abbi tín skuldu gera eina avtalu, tá ið tey vóru ung, uttan at hittast! Hvønn samskiftismøguleika heldur tú, at tey nýttu? ____________________

Skriva samskiftið her:







Hvørjar samskiftismøguleikar kennir tú?

______________________________________________

______________________________________________

______________________________________________

______________________________________________



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

# Vit gera eina samrøðu

**Frágreiðing!**
Spurnarfornøvn verða nýtt, tá ið vit spyrja um okkurt. Spurnarfornøvnini eru *hvør* og *hvat*!

Dømi: *Hvør* var handa gentan, sum skeyt málið?
*Hvat* heldur tú um dystin?

Spurnarfornøvnini bendast soleiðis:

| eintal | kallkyn | kvennkyn | hvørkikyn |
|---|---|---|---|
| hvørfall | hvør | hvør | hvat |
| hvønnfall | hvønn | hvørja | hvat |
| hvørjumfall | hvørjum | hvørjari | hvørjum |
| hvørsfall | hvørs | hvørjar | hvørs |
| **fleirtal** | | | |
| hvørfall | hvørjir | hvørjar | hvørji |
| hvønnfall | hvørjar | hvørjar | hvørji |
| hvørjumfall | hvørjum | hvørjum | hvørjum |
| hvørsfall | hvørja | hvørja | hvørja |

Hvørjum falli stendur spurnarfornavni í?

| | |
|---|---|
| *Hvat* segði tú? | hvønnfalli |
| *Hvørjum* fylgdist tú við? | hvørjumfalli |
| *Hvørs* sonur ert tú? | hvørsfalli |
| *Hvat* gert tú? | hvønnfalli |
| *Hvørja* gentu dámar tær best? | hvønnfalli |
| *Hvør* eigur teg? | hvørfalli |
| *Hvør* gongur her? | hvørfalli |
| *Hvønn* spælir tú við? | hvønnfalli |
| *Hvørjir* eru tit? | hvørfalli |
| *Hvørji* børn koma við? | hvørfalli |
| *Hvørjari* gentu møtti tú? | hvørjumfalli |



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur




Ger 6 setningar, sum byrja við spurnarfornavni!

**Frágreiðing!**
Vit nýta eisini spurnarhjáorðini, tá ið vit spyrja um okkurt! Spurnarhjáorðini eru t.d. *hvar, hví, hvussu og nær*!

Silja og Tóki skulu gera eina samrøðu við tvey 14 ára gomul børn í Havn, – eina gentu og ein drong. Tey skulu fáa at vita, hvat ungfólk í Havn takast við eftir skúlatíð.

Tú fært 10 minuttir til hesa uppgávuna!
Hjálp Silju og Tóka at fyrireika samrøðuna. Hvørjar spurningar skulu tey seta børnunum. Skriva í minsta lagi 12 spurningar!
Minst til at seta spurnartekn eftir spurningin!






© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur




Silja og Tóki spyrja teg somu spurningar. Svara teimum!

Í hesari uppgávuni er svarið skrivað. Skriva tú spurningin!

| spurningur | svar |
|---|---|
| | Tí eg ikki orkaði upp. |
| | 24. desember. |
| | Til Onglands. |
| | Eg dugi ikki at syngja. |
| | Hálvgum átta. |
| | Nei, eg fari at venja. |
| | Føroyskt. |
| | Blaðfólk. |
| | Svimji og spæli blokkfloytu. |
| | Mikudagur. |
| | Eg eri størri. |
| | Í morgin. |
| | 15 tær bestu. |
| | Tí eg var og svam. |






© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

## Krossorðagáta

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | spurnar-hjáorð | lýsingarh. tátíð av at verja | drongur → / óð í høvdinum | á | 2. per-sónur ↓ | t |
| spurnar-fornavn | h | v | ø | r | høvuðs-staður | ú |
| ansin | v | a | r | i | n | |
|  | u | r | drongur | sjálvljóð / góðan hárvøkst | u | ? og kellingin |
|  | s | t | ó | l | u | r |
| aftan á r → | s | gudur → / 20. bókst. | l | o | k | i |
| klokkan | u | r | i | ð | áðrenn t / tvey eins sjálvljóð | s |
| | aftan á k | | trý eins sjálvljóð nóti | i | i | i |
| ósann-indini | l | y | g | n | i | n |





© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

# Bókaummæli

**Fyrisøgn**

Beinta og Búgvi fara oman í miðbýin tey ætla sær á bókasavnið at læna tvær bøkur sum tey skulu ummæla Búgvi býr í Havn so hann kennir Havnina bæði væl og virðiliga hann vísir Beintu hvar øll støðini eru ið hon bara hevur hoyrt onnur tosað um tey ganga fram við ítróttarøkinum tvey lið spæla fótbólt á niðara vølli her hevur Beinta verið áður tí hon hevur spælt fótbólt í nógv ár

Tey bæði ganga fram við SMS. Her eru bæði bilar og fólk. Búgvi møtir eini gentu úr flokkinum, so tey steðga á at práta. Gentan vil vita, hvar tey fara, og hvussu gongur á Dimmalætting. Tey bæði láta væl at og siga, at tað er rættiliga stuttligt sjálvi at sleppa at royna seg sum blaðfólk.

Veðrið er gott, og niðri í miðbýnum eru nógv fólk. Nøkur standa uttan fyri biografin, og onnur hava leitað sær oman á Vaglið. Beinta og Búgvi fara inn á bókasavnið. Búgvi finnur skjótt báðar bøkurnar. Hann hevur altíð gingið nógv á bókasavninum, so hann veit, hvar allar bøkurnar standa.

Áðrenn tey fara til húsa aftur, fara tey ein túr inn á teldukaféina. Hølið er fult av fólki. Tey flestu sita við teldurnar, men nøkur sita og práta. Búgvi spælir eitt spæl saman við nøkrum øðrum dreingjum, og Beinta setur seg at kjatta.

Set punktum í fyrisøgnina frá reglu 1 - 6!
Finn umsøgn og grundlið í sama brotið og set komma!
Set grøna striku undir høvuðsetningarnar og reyða striku undir eykasetningarnar í brotinum.

Finn úr fyrisøgnini 4 bundin navnorð í hvørkikyni! Tey standa á 1., 12., 13. og 18. reglu.

| | |
|---|---|
| bókasavnið | Vaglið |
| veðrið | hølið |





© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Finn 7 navnorð í 1. brotinum í fyrisøgnini!
Minst til, at navnorð broytist alt eftir, hvørjum tali og falli tað stendur í.
Skriva tey í talvuna í hvørfalli, eintali og fleirtali, óbundin og bundin!

| óbundið | | bundið | |
|---|---|---|---|
| eintal | fleirtal | eintal | fleirtal |
| miðbýur | miðbýir | miðbýurin | miðbýirnir |
| bókasavn | bøkasøvn | bókasavnið | bókasøvnini |
| bók | bøkur | bókin | bøkurnar |
| stað | støð | staðið | støðini |
| ítróttarøki | ítróttarøki (r) | ítróttarøkið | ítróttarøkini |
| fótbóltur | fótbóltar | fótbólturin | fótbóltarnir |
| vøllur | vallir | vøllurin | vallirnir |

Finn í fyrisøgnini 12 sagnorð, sum standa í 3. persóni nútíð eintali! Tey standa á 2., 3., 3., 5., 8., 8., 9., 10., 14., 15., 19. og 20. reglu.

| | | | |
|---|---|---|---|
| býr | hevur | gongur | veit |
| kennir | møtir | er | spælir |
| vísir | vil | finnur | setur |

Finn í fyrisøgnini 4 sagnorð, sum standa í lýsingarhátti í tátíð og enda við -ð!

| | | | |
|---|---|---|---|
| verið | tosað | leitað | gingið |

Bend hesi sagnorð: kenna, spæla, finna, tosa, møta, ganga, vísa og búgva

| navnháttur | 3.pers í nútíð | tátíð | tátíð í fleirt. | lýsingarh. í tátíð | boðsháttur í fleirtali |
|---|---|---|---|---|---|
| at kenna | hann kennir | kendi | kendu | kent | kennið |
| at spæla | - spælir | spældi | spældu | spælt | spælið |
| at finna | - finnur | fann | funnu | funnið | finnið |
| at tosa | - tosar | tosaði | tosaðu | tosað | tosið |
| at møta | - møtir | møtti | møttu | møtt | møtið |
| at ganga | - gongur | gekk | gingu | gingið | gangið |
| at vísa | - vísir | vísti | vístu | víst | vísið |
| at búgva | - býr | búði | búðu | búð | búgvið |



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Verður orðið skrivað við a ella æ? – Set ring um tað rætta og skriva orðið!

| | a | æ | skriva orðið |
|---|---|---|---|
| œtla | a | (v) | œtla |
| fara | (k) | r | fara |
| lœna | a | (æ) | lœna |
| ummœla | l | (r) | ummœla |
| bœði | a | (b) | bœði |
| spœla | k | (u) | spœla |
| hvar | (j) | m | hvar |
| vœl | u | (d) | vœl |
| spœlt | k | (l) | spœlt |
| lata | (a) | i | lata |
| rœttiliga | r | (e) | rœttiliga |
| bladfólk | (t) | s | bladfólk |
| hava | (t) | a | hava |
| tvœr | i | (t) | tvœr |

Set saman bókstavirnar, har tú setti ring um a: kjatt

Set saman bókstavirnar, har tú setti ring um æ: teldubrœv

Finn tað øvugta av hesum orðum og skriva tað tvær ferðir!

| | | | |
|---|---|---|---|
| ovara | niðara | niðara | (5) |
| fá | nógv | nógv | (6) |
| illa | vœl | vœl | (10) |
| keðiligt | stuttligt | stuttligt | (10) |
| ringt | gott | gott | (12) |
| innan fyri | uttan fyri | uttan fyri | (13) |
| niðan | oman | oman | (13) |
| út | inn | inn | (14) |
| ongantíð | altíð | altíð | (15) |
| aftaná | áðrenn | áðrenn | (17) |
| tømt | fult | fult | (18) |



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

# Blaðgrein




Tú fært 5 minuttir til hesa uppgávuna! – Finn so nógv navnorð sum gjørligt!

Á 1. mynd: ______________________________

Á 2. mynd: ______________________________

Á 3. mynd: ______________________________



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Tú fært 5 minuttir til hesa uppgávuna!

Hvat gera fólkini á myndunum?

Á 1. mynd: ______________________________

______________________________

______________________________

Á 2. mynd: ______________________________

______________________________

______________________________

Á 3. mynd: ______________________________

______________________________

______________________________

Vel 8 persónar ella lutir á myndunum og lýs teir!
Dømi: drongurin er stórur og sterkur

______________________________

______________________________

______________________________

______________________________

______________________________

______________________________

______________________________

______________________________

Vel 6 persónar á myndunum. Greið frá, hvar teir eru staddir. Tú skalt nýta fyriseting + stýring!

Dømi: gentan er á vippuni
drongurin situr undir trappuni

______________________________

______________________________

______________________________

______________________________

______________________________

______________________________

______________________________

______________________________



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Tú skalt skriva eina grein um ítriv í Havn. – Tú skalt nýta eina av myndunum til greinina!

Tú fært 3 minuttir – Ger hugarok!

Tú fært 5 minuttir!
Hvat ætlar tú tær at hava við í greinina? – Ger tankakort og skipa tey!

Tú fært 15 minuttir – Skriva greinina! Ger eisini yvirskrift!





© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

# Tykkara blað

**Frágreiðing:**

*Ognarfornøvnini* siga frá onkrum, ið eigur okkurt. *Tykkara* er eitt ognarfornavn. Í yvirskriftini sigur orðið *tykkara* okkum, hvør eigur blaðið!
Ognarfornøvnini eru:

| | | | |
|---|---|---|---|
| mín | tygara | tess | tykkara |
| tín | hansara | okkara | teirra |
| sín | hennara | vár | |

Dømi: Hetta er taska *hennara*.
Tað er *mín* avgerð.

Mín bendist soleiðis:

| | kallkyn | kvennkyn | hvørkikyn |
|---|---|---|---|
| **eintal** | | | |
| hvørfall | mín | mín | mítt |
| hvønnfall | mín | mína | mítt |
| hvørjumfall | mínum | mínari/míni | mínum |
| hvørsfall | míns | mínar | míns |
| **fleirtal** | | | |
| hvørfall | mínir | mínar | míni |
| hvønnfall | mínar | mínar | míni |
| hvørjumfall | mínum | mínum | mínum |
| hvørsfall | mína | mína | mína |

*Tín* og *sín* bendast sum mín!

Tygara, hennara, tess, okkara, tykkara og teirra bendast ikki!

**Frágreiðing:**

*Afturbeindu* fornøvnini eru hesi: *ið* og *sum*.
Tey vísa aftur á eitt ella fleiri orð, sum eru nevnd frammanundan.

Dømi: Drongurin, ið spældi bólt, var úr Havn.
Filmurin, sum Silja og Tóki sóu, var spennandi.



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Er fornavnið *persóns-, ognar- afturbeint-* ella *ávísingarfornavn*? – Set ring um tað rætta!

| | persóns-fornavn | ognar-fornavn | afturbeint | ávísing-arforn. |
|---|---|---|---|---|
| Hetta er *mín* ketta. | l | s | a | l |
| Eg fekk bóltin, *sum* eg ynskti mær. | e | a | s | a |
| *Hon* gav mær ringin. | o | l | k | d |
| *Eg* takkaði. | k | k | j | u |
| Vit skrivaðu *okkara* blað. | n | í | e | l |
| Kennir tú *handan* mannin? | a | s | r | t |
| Eg sá *ta* vøkru gentuna. | s | t | t | a |
| *Vit* gingu ein túr. | k | r | a | r |
| Hon gav mær *sín* jakka. | e | n | m | e |
| Jakkin, *sum* hon gav mær, var bláur. | r | o | u | s |
| Sást tú *tað* stóra træið. | t | k | s | ð |
| Kemur *tú* við? | u | l | t | i |
| *Tit* kunnu øll koma við. | m | æ | r | r |
| Gentan, *ið* eg sá, var vøkur. | i | r | m | i |

Set bókstavirnar saman, har tú hevur sett ring um ávikavíst persóns-, ognar-, afturbeint og ávísingarfornavn og skriva orðini her:

okkum, sín, sum og tað.

**Fyrisøgn!**

Tóki hevði í gjár uppskot um, at tey kundu gera sítt egna blað. Hetta kundi vera eitt blað, ið bert skuldi verða lisið av teirra floksfeløgum. Blaðið skuldi hava tíðindafrásagnir, greinir, ummæli o.t., ið tey hava skrivað, meðan tey hava verið í Havn, men eisini tekstir við samrøðum, ið siga frá, hvussu gingist hevur at samansjóða 8 ung í eina viku.

Øll hildu, at uppskotið hjá Tóka var frálíkt, og Beinta helt, at blaðið skuldi hava heitið „Okkara blað“.

Í dag eru øll í gongd við at skriva greinir og frásagnir til blaðið, tí nakrar greinir mugu skrivast afturat. Beinta hevur prátað við lærararnar, Símun og Jóhonnu, um teirra leiklut í vikuni, og Búgvi hevur tosað við nøkur blaðfólk á Dimmalætting. Høgnar hevur tikið myndir av Beintu, Búgva, Ásu og Høgna og sett teimum nakrar spurningar um vikuna í Havn, ið tey fýra so hava svarað uppá.

Hanna hevur skrivað oddagreinina, og Ása hevur skrivað nakrar reglur um,



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

hvussu tað er at ganga í einum lítlum skúla, har fleiri flokkar eru saman í einum høli, og har ið øll skulu fara í annan skúla, tá ið tey fara í 8. flokk. Høgni og Búgvi, ið báðir eru sera áhugaðir í telduarbeiði, hava bjóðað sær til at seta blaðið upp og at geva tað út.

Set striku undir persónsfornøvnini í fyrisøgnini! Tey standa á 1., 3., 4., 12., 15.,16. og 18. reglu

Frá 1. til 7. reglu í fyrisøgnini eru 4 ymisk navnorð í hvørkikyni. Finn tey og bend tey í hvørfalli eintali og fleirtali, bæði óbundin og bundin!

| óbundið | | bundið | |
|---|---|---|---|
| **eintal** | **fleirtal** | **eintal** | **fleirtal** |
| uppskot | uppskot | uppskotið | uppskotini |
| blað | bløð | blaðið | bløðini |
| ummæli | ummæli | ummælið | ummælini |
| heiti | heiti | heitið | heitini |

Finn í fyrisøgnini 8 ymisk sagnorð, sum standa í lýsingarhátti í tátíð! Tey standa á 2., 3., 4., 9., 10., 11., 13. og 17. reglu.

lisið verið tosað svarað

skrivað prátað tikið bjóðað

Finn fjald støð í Havn. – Set bókstavirnar rætt saman. Fyrsti bókstavur er skrivaður við stórum!

rldnGauadu nlionhlBvgløi ðlaVig sgnaTnei

ivsbarýBkaóanð niivhjSmliøl ilødmBnnaithln

úadouðaNrrlnðhis

Skriva tey her:

Gundadalur, Bovlinghøllin, Vaglið, Tinganes, Býarbókasavnið, Svimjihøllin, Badmintonhøllin, Norðurlandahúsið



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

# Skrínið

Vit hava í hesum partinum arbeitt við:

- navnorðum
- sagnorðum
- lýsingarorðum
- fornøvnum
- spurnarhjáorðum
- teknseting
- høvuðssetningum og eykasetningum

Vit hava nú nomið við allar orðaflokkarnar: navnorð, sagnorð, lýsingarorð, talorð, fornøvn, hjáorð, miðalvarpingar, fyrisetingar, sambindingarorð og kenniorð.

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| eyga | mín | risi | sum | býta | stór | yvir |
| tíðliga | í | undir | at | argaði | hvussu | ið |
| stólurin | hon | og | tí | úti | krevur | eta |
| sætti | hitt | dekan | eg | fý | hey | hinum |
| lítli | tykkara | gingið | so | bræv | trý | tvinnir |
| sera | vakrastur | hasin | nakin | úr | hesin | bygd |
| dúgliga | kortini | áttandi | tjúgu | | | |



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Být orðini í skríninum sundur í hesar orðaflokkar:

navnorð: ____________________
sagnorð: ____________________
lýsingarorð: ____________________
talorð: ____________________
hjáorð: ____________________
fyrisetingar: ____________________
sambindingarorð: ____________________
kenniorð: ____________________
fornøvn: ____________________
miðalvarpingar: ____________________

Bend navnorðini úr skríninum í talvuna, óbundin og bundin í hvørfalli, eintali og fleirtali!

| óbundið | | bundið | |
|---|---|---|---|
| **eintal** | **fleirtal** | **eintal** | **fleirtal** |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |

Fallbend somu navnorð óbundin!

| **eintal** | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| hvørfall | | | | | |
| hvønnfall | | | | | |
| hvørjumfall | | | | | |
| hvørsfall | | | | | |
| **fleirtal** | | | | | |
| hvørfall | | | | | |
| hvønnfall | | | | | |
| hvørjumfall | | | | | |
| hvørsfall | | | | | |



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Bend sagnorðini úr skríninum í talvuna!

| navnháttur | 3. persónur í nútíð | tátíð í eintali | tátíð í fleirtali | lýsingarh. í tátíð | boðsháttur í fleirtali |
|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |

Bend lýsingarorðini úr skríninum eftir kyni!

| kallkyn | kvennkyn | hvørkikyn |
|---|---|---|
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |

Stigbend somu orð í kallkyni! – Minst til, at lýsingarorð í kallkyni enda við *-ur* í hástigi!

| grundstig | miðstig | hástig |
|---|---|---|
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |

Být fornøvnini í skríninum sundur í hesar flokkar:

persónsfornøvn: ______________________________

afturbeind fornøvn: ______________________________

ávísingarfornøvn: ______________________________

ognarfornøvn: ______________________________



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Být hjáorðini í skríninum sundur í hesar serflokkar:

| staðar-hjáorð | tíðar-hjáorð | spurnar-hjáorð | munar-hjáorð | lýsingar-hjáorð | onnur hjáorð |
|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | |

Být talorðini sundur í grundtøl, raðtøl og skiftistøl!

| grundtøl | raðtøl | skiftitøl |
|---|---|---|
| | | |
| | | |

Set røtt tekn í hetta brotið!

Tey átta børnini sum í eina viku hava búð og arbeitt saman í Havn eru nú farin hvør til sítt áðrenn tey skiltust lovaðu tey hvør øðrum at senda teldupost av og á
seinasta kvøldið ið tey vóru saman helt Høgnar eina stutta røðu har hann m.a. segði vit eru vorðin vinfólk fyri lívið og vit mugu royna at hittast øll somul um ikki so langa tíð øll klappaðu tá ið Høgnar var liðugur og Silja reisti seg og bað øll rópa eitt trífalt hurrá hurrá hurrá hurrá rungaði í tí lítlu stovuni

Set grøna striku undir høvuðssetningarnar og reyða striku undir eykasetningarnar.



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

# Krossorðagáta

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2. persónur | afturbeint ↓ / fornavn / ítriv | | akfar ↓ / boyggja/ røra | | ávísningar ↓ fornavn | |
| tíðar- hjáorð → | | 4 | | | | | |
| staðar hjáorð | | | á fóti / vilt | | | nikka í boðshátti fleirtali | |
| | taluni / fornavn í fleirtali | 3 | | 7 | | 5 | |
| drongur → | | | | | | | |
| landnyrð- ingur / planta | | | | øvugta av eingin | aftan á p | | |
| ↳ | | | skip / liggja í tátíð | | | 2 | |
| rópaði hart | á seyði | | | | danskt dreingja navn | | |
| 1 ↳ | | | | | | | 6 |

Set bókstavirnar frá 1 – 7 saman: ______________________



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

# Eyka uppgávur

Být kassaorðini í rættar orðaflokkar!

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| flyta | uppi | tvinnir | ið | króna | tví |
| hinum | til | svangur | ein | avbera | jakki |
| fý | reypar | nakin | tykkara | hey | krov |
| einum | lás | fiskaði | áttati | undir | tíðliga |
| klók | kortini | hjá | eg | áttandi | hini |
| eya meg | dýrt | græt | fyri | mín | trý |

| navnorð | sagnorð | lýsingarorð | hjáorð | fyriseting |
|---|---|---|---|---|
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |

| talorð | fornøvn | kenniorð | miðalvarping |
|---|---|---|---|
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Hvat merkja orðini – Set x við tað rætta!
Til ber at hyggja í móðurmálsorðabókina.

| | | | |
|---|---|---|---|
| **avmintur:** | heitur ☐ | gloymskur ☐ | mettur ☐ |
| **ábærur:** | hábærsligur ☐ | flottur ☐ | veðurringur ☐ |
| **bølluskýggj:** | illveður ☐ | toka ☐ | stormur ☐ |
| **hvítmylingur:** | sjóvarilska ☐ | hvíthærdur ☐ | bleikur ☐ |
| **jolla:** | taska ☐ | sjófar ☐ | súkkla ☐ |
| **lortaprinsur:** | vánamaður ☐ | skilamaður ☐ | gamal maður ☐ |
| **duddur:** | arr ☐ | sár ☐ | lortur ☐ |
| **meyka:** | lurta ☐ | dreiva ☐ | rópa ☐ |
| **murubrek:** | skaði ☐ | ørvitisskapur ☐ | óhapp ☐ |
| **silvurspentur:** | gyltur ☐ | glitrandi ☐ | glógvandi ☐ |
| **skrenja:** | grenja ☐ | skríggja ☐ | knarra ☐ |
| **slyðr:** | kloddakot ☐ | sáta ☐ | regn ☐ |
| **slýtráður:** | gras ☐ | rót ☐ | tari ☐ |
| **slyðrast:** | dovnast ☐ | arbeiða ☐ | rokast ☐ |
| **svínakjálki:** | toskur ☐ | óflýggjakroppur ☐ | ungt svín ☐ |
| **valmannadrykkur:** | øl ☐ | eitur ☐ | vatn ☐ |
| **vørild:** | vatn ☐ | gras ☐ | mold ☐ |
| **øtlandi:** | vaksandi ☐ | minkandi ☐ | ræðandi ☐ |



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Greina setningarnar og set komma!

Hanus og Katrin spæla teldu og Jóna og Haraldur sparka bólt.

Mamma flysir eplir meðan pápi setur á borðið.

Jóannis eltir bollar tá ið vinmaður hansara kemur inn.

Hundurin liggur í gongini og svevur.

Vit plaga altíð at fara tíðliga í song tá ið vit skulu í skúla.

Mamma og pápi eru til arbeiðis so eg eri einsamøll inni.

Hansina vaskar bilin hjá pápa sínum.

Mamma gav mær peningin so eg kundi gjalda bókina.

Vit syngja í kórinum sum skal hava konsert í morgin.

Tóri og Jonna geva mær ein bólt í føðingardagsgávu.

Hanus vann spurnarkappingina sum var í útvarpinum.

Lív etur altíð rugbreyð um morgunin og hon drekkur mjólk afturvið.

Kavin er komin og tað er sera kalt.

Hvar fert tú aftan á skúlatíð?

Vit ætla okkum til Havnar.

Eg sá gamla mannin ið eigur tann stóra hundin.

Eg fari til hús at eta áðrenn eg skal venja.

Hann var ov seinur hóast hann skundaði sær.



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Hvør liður er undirstrikaða orðið í setninginum?

Maðurin gav gentuni peningin ______________________

Konan møtti stóra manninum ______________________

Eg sá kettuna ______________________

Jónas fór í skúla klokkan 9 ______________________

Hann klappaði fitta hundinum ______________________

Maðurin er stórur ______________________

Sólin skínur bæði oman og niðan ______________________

Eg var uppi hjá ommu í morgun ______________________

Hann gava mær breyð at eta ______________________

Dunnan verpur eitt egg um dagin ______________________

Húsini eru málað reyð ______________________

Drongur hevur skrivað eina søgu ______________________

Vit ganga øll í skúla ______________________

Skipið siglir inn eftir vágni ______________________

Hon er í reyðum kjóla ______________________

Hann hevur ilt í beininum ______________________

Vit góvu rossinum at eta ______________________

Gev mær spannina ______________________



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

Skriva ein setning har:

- grundliðurin er eitt navnorð í kallkyni
- umsøgnin stendur í nútíð
- ávirkið er eitt navnorð í kvennkyni
- ein fyriseting er við

Skriva ein setning har:

- grundliðurin er eitt sernavn
- umsøgnin stendur í tátíð
- ávirkið er eitt navnorð í hvørkikyni
- ein fyriseting er við

Skriva ein setning har:

- grundliðurin er eitt fornavn
- umsøgnin stendur í nútíð
- ávirkið er eitt navnorð í kallkyni
- ein fyriseting er við

Skriva ein setning har:

- grundliðurin er eitt navnorð í hvørkikyni
- umsøgnin er samansett av tveimum sagnorðum
- ávirkið er eitt navnorð í kvennkyni
- ein fyriseting er við



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

# Krossorðagáta

| | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | lyfta ↓ / høvuðs-staður | | vekt | | | ov | fáa sær mat ↓ | |
| | besta tíð | | 1 | | kilo-metur | ílat → / fiskur | | | |
| land í Afrika → | | | | | | | | amboð | |
| | Norðurland → | | | | | | | | |
| klokka | | | missa hár | | hjálj. / kvenn-kópur | | í løtuni | | |
| spæl ↳ | á fóti → / fuglur | | | heldur → | | 2 | | | Rín |
| | | | | 3,14 | 5 | | vigaði → | | |
| náttúru-tilfeingi ↳ | | játtan | | | | | sjálvlj. / tóni | | |
| | | | 6 | ongan-tíð → / ókókað | | | | | |
| tveir eins | | | hjálj. → / øvugt av tá | | øvugt av nú | á fóti | 4 | vera í nútíð | |
| | | hav-hestur | | | | | 1. pers. | | |
| gift kona | | 3 | | fiskur → | | | | | |

Set bókstavirnar saman frá 1-6: ______________________



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

# Vegleiðing

## Síða 8 – 13

Uppgávurnar í „Samspæl" eru gjørdar sum ein postarenning. Næmingarnir skulu loysa nakrar uppgávur til tess at finna rætta loysunarorðið.

Hvør uppgáva hevur sítt loysunarorð, sum næmingurin finnur á myndini á bls. 8. Bókstavurin, ið næmingurin skal finna til hvørja uppgávu, er tann, ið stendur við røttu myndina á bls. 8.

Seinast í postarenningini skulu næmingarnir seta bókstavirnar í hvørjari uppgávu saman og á henda hátt finna seinasta loysunarorðið.

Uppgávan á bls. 8 setur gongd á postarenningina. Hetta er ein uppgáva við bókstavaraðnum, har sum næmingarnir skulu skriva bókstavin, ið kemur áðrenn ella eftir tann ávísta bókstavin í bókstavaraðnum. Tá ið næmingarnir seta orðini í litaðu puntunum saman, fáa teir at vita tað, sum teir skulu gera í postarenningini. Hava næmingarnir áður arbeitt við „Eg skrivi" bókunum, eiga teir at kunna arbeiða sjálvstøðugt við postarenningini.

Í uppgávuni á bls. 9, skulu næmingarnir byrja við bókstøvunum, sum eru skrivaðir við feitum og finna orð, sum hoyra til sama orðaflokk. Orðini frá H eru navnorð og fara til vinstru: Hill, lykil, lás, summar, rót, toskur o.s.fr. Stóri bókstavurin er S.

Orðini frá G eru sagnorð og fara uppeftir: Gongur, renna, argar (á skák), rópar o.s.fr. Stóri bókstavurin er eitt N.

Orðini frá B eru hjáorð og ganga til høgru: beinleiðis, sjáldsama, aftan o.s.fr. Stóri bókstavurin er G.

Orðini frá R eru lýsingarorð og fara til høgru: reytt, tungur, reyðan o.s.fr. Stóri bókstavirin er O.

Loysanarorðið er song.

## Síða 14 – 18

Í hesum partinum verður fyri fyrstu ferð tosað um høvuðssetningar og eykasetningar. Víst verður á tey fýra sløgini av høvuðssetningum og eykasetningum.

Til ber at lata næmingarnar siga nakrar setningar fyri síðani í felag at finna útav, um setningarnir eru høvuðssetningar ella eykasetningar.

Eisini verður her komið inn á sambindingarorð, og víst verður við dømum á, hvussu sambindingarorðini binda saman setningar og orð.

## Síða 19 – 23

Í hesum partinum verður arbeitt við at benda sagnorð í persónum og tíðum. Næmingar og lærari lesa Hørpurímu á bls. 19 í felag og práta um innihaldið. Síðani ber til at práta um, at sagnorðini í einum teksti vísa, hvat ið gjørt verður, og at sagnorðini knýta seg at persónum og tíðum. Lærari og næmingar práta um, hvussu sagnorð verða bend. Næmingarnir skulu læra seg persónsfornøvnini í eintali og fleirtali og síðan finna sagnorðini í Hørpurímu. Tey skulu skrivast niður eftir persónum, tíðum og hættum. Er hetta ov torført hjá onkrum næmingum, kunnu hesir næmingar loysa uppgávuna saman við læraranum.

Í sambandi við setningin „Systir talar til systur góð", sum er í Hørpuríma, verður víst á, hví tað onkuntíð eitur systir og onkuntíð systur. Skyldskaparorðini verða bend á bls. 23, og næmingarnir loysa eina uppgáva, har sami setningur verður brúktur, bara við øðrum skyldskaparorðum.

## Síða 24 – 27

Næmingarnir finna orð í uppgávuni á bls. 24, sum teir býta í orðaflokkar. Síðan verður arbeitt við navnorðunum, fyrst at býta tey eftir kyni og síðan at benda tey óbundin og bundin í hvørfalli eintali.

Síðani verða trý navnorð fallbend óbundin og bundin. Út frá bendu navnorðunum eigur lærarin at práta við næmingarnar um, at bundnu navnorðini fáa ending knýtta at sær. Bundin hvørkikynsorð enda við ð ella ið, men hetta kann



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

vera torført hjá næmingum at minnast. Tí ber til at vísa teimum, at teir kunnu seta eitt bundið kallkynsorð inn í staðin fyri hvørkikynsorðið, t.d. báturin, og blívur hetta til báturin (hvørfall eintal) ella bátin (hvønnfall eintal), so endar hvørkikynsorðið við ið ella ð. Tað hevur týdning, at næmingarnir skilja, at eitt bundið navnorð bara kann setast inn fyri eitt annað navnorð, og at bara bundnu hvørkikynsorðini enda við ið ella ð.

Á bls. 26 er ein innsetingaruppgáva, har næmingarnir kunnu seta i, ð ella ið inn við at seta eitt bundið kallkynsorð inn í staðin.

Í uppgávuni niðast á bls. 26 og ovast á bls. 27 skulu næmingarnir arbeiða við lýsingarorðunum, teir funnu á bls. 24, og í uppgávuni mitt á bls. 27 skulu teir benda fýra sagnorð úr somu uppgávu.

**Síða 28 – 31**

Næmingarnir lesa fyrisøgnina á bls. 28, ella flokkurin lesur hana saman. Næmingarnir arbeiða við fyrireikingaruppgávunum til fyrisøgnina á bls. 28 – 31, áðrenn teir skriva fyrisøgnina, sum er gjørd á tveimum torleikastigum. Lærarin kann lesa komma ella lata næmingarnar sjálvar seta komma. Tað ber eisini til at siga nøkur komma og lata næmingarnar sjálvar seta hini.

**Síða 32 – 37**

Skrínið tekur saman um tað, sum flokkurin hevur arbeitt við frammanundan í bókini. Tí eiga næmingarnir at kunna arbeiða í skríninum sjálvstøðugt. Á bls. 35 er ein fyrisøgn, sum verður skrivað, tá ið næmingarnir hava arbeitt við fyrireikingaruppgávunum. Fyrisøgnin er á tveimum torleikastigum. Lærarin kann lesa komma ella lata næmingarnar sjálvar seta komma í alla fyrisøgnina ella partar av henni.

**Síða 38 – 44**

Næmingarnir finna orð í villiniborgini hjá Høgna og Silju, sum er myndað sum tvær ballónir. Næmingarnir skriva síðani navnorðini, ið vóru á rætta vegnum í ballónini hjá Høgna og tey, ið vóru í ballóni hjá Silju, undir navnorð og seta lýsingarorð, ið eisini vóru á vegnum saman við navnorðunum. Á bls. 39 og 40 verður arbeitt við orðunum úr ballónunum.

Á bls. 43 skulu næmingarnir finna fjaldar merkisdagar og býta teir í messur og søkur, stevnur, høgtíðir og halgidagar og merkisdagar. Til ber at práta við næmingarnar um ymiskar merkisdagar, áðrenn uppgávan verður loyst.

**Síða 45 – 46**

Á bls. 45 er ein aftursøgn. Lærarin lesur aftursøgnina fyri næmingunum, ella næmingarnir lesa hana sjálvir. Lærari og næmingar práta um aftursøgnina, hvat hon snýr seg um og hvat, ið er av serligum týdningi, tá ið tú skalt endurgeva innihaldið.

Næmingar og lærari kunnu skriva lyklaorðini í felag, men til ber eisini at lata hvønn næmingin skriva síni lyklaorð.

Næmingarnir skriva aftursøgnina, soleiðis sum teir minnast hana. Teir skulu ikki hyggja í tekstin, men nýta síni egnu orð.

Loysunarorðið á bls. 46 er Dimmalætting.

**Síða 47 – 51**

Á bls. 47 er ein fyrisøgn, sum næmingarnir lesa sjálvir ella í felag. Uppgávurnar, sum hoyra til fyrisøgnina verða gjørdar, áðrenn fyrisøgnin verður skrivað. Fyrisøgnin er á tveimum torleikastigum, og lærarin kann avgera, um hann lesur komma ella ikki.

Á bls. 49 – 51 verður arbeitt við fornøvnunum, persóns- og ávísingarfornøvnum. Tey verða bend og innsetingaruppgávur eru bæði til persónsfornøvnini og ávísingarfornøvnini. Dentur eigur at verða lagdur á at vísa næmingunum á, at ávísingarfornavnið í kvennkyni hvønnfalli eitur ta, men ikki verður skrivað við ð. Tí hevur ta einki ð, tá tað er knýtt at kvennkynsorði.

**Síða 52 – 54**

Í hesum partinum verður arbeitt eitt sindur við yrkisbókmentum og fagurbókmentum. Lærari og næmingar práta um hetta, og næmingarnir býta bøkurnar á bls. 52 í yrkisbókmentir og



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

fagurbókmentir. Á bls. 54 er ein uppgáva at finna fjaldar yrkisbókmentir. Bøkurnar eru: Álmanakkin, Flaggsøgan, Flytifuglar, Fróðskaparrit, Føroysk barnaspøl, Góðaráð, Heilsukostur, Heimsatlas, Litflora, Mannakroppurin, Mondul, Orðafar, Stríðsárini og Telefonbókin.

**Síða 55 – 57**

Á bls. 55 er ein fyrisøgn. Næmingarnir lesa fyrisøgnina sjálvir ella saman og arbeiða við uppgávunum, ið hoyra til á bls. 55 og 56. Krossorðagátan á bls. 57 kann nýtast sum eyka uppgáva til teir næmingar, ið skjótt verða lidnir við fyrireikingaruppgávurnar. Fyrisøgnin er so mikið long, at hon kann verða skrivað í tveimum. Lærarin velur, um hann lesur komma ella letur næmingarnar sjálvar seta komma í allan tekstin ella partar av honum.

**Síða 58 – 61**

Prátað verður um týdningin av at seta tekn í tekst. Lærarin kann geva næmingunum ein langan tekst uttan tekn fyri at vísa teimum á, hvussu torført tað er at lesa ein tílíkan tekst. Prátað verður um, hvørji tekn eru, og nær tey verða brúkt. Í tekstinum á bls. 58 skulu næmingarnir seta punktum, finna umsøgn og grundlið og seta komma. Hetta eiga teir nú at klára uttan serliga hjálp.

Í uppgávuni mitt á bls. 59 skulu teir skriva, um setningarnir frammanfyri eru høvuðs- ella eykasetningar, umframt at teir eisini skulu vísa á, hvat slag av eykasetningi, talan er um. Hetta kann vera torført hjá næmingunum, og onkur skal helst hava hjálp til hesa uppgávuna. Til ber at arbeiða við uppgávuni í felag, ella at seta teir næmingar saman, ið ikki klára uppgávuna, og lata hesar gera uppgávuna saman við læraranum. Til ber eisini at biðja næmingarnar hyggja á bls. 14 – 18, har teir áður hava arbeitt við setningum.

**Síða 62 – 64**

Lærari og næmingar práta um samskiftismøguleikar fyrr og nú. Síðani verða uppgávurnar loystar. Til ber at lata næmingar arbeiða einsamallar, tveir og tveir ella í bólkum.

**Síða 65 – 68**

Arbeitt verður við spurnarfornøvnunum hvør og hvat. Orðini verða bend, og næmingarnir skulu arbeiða við nøkrum uppgávum, sum snúgva seg um spurnarfornøvnini. Síðani verður víst á spurnarhjáorðini, og næmingarnir fyrireika nakrar spurningar, har spurnarhjáorðini verða nýtt.

**Síða 69 – 71**

Næmingarnir lesa fyrisøgnina á bls. 69 sjálvir ella saman. Áðrenn fyrisøgnin verður skrivað, arbeiða næmingarnir við fyrireikingaruppgávunum á bls. 69 – 71.

Fyrisøgnin er á tveimum torleikastigum. Lærarin kann lesa komma ella lata næmingarnar seta komma í allan tekstin ella partar av honum.

**Síða 72 – 74**

Flokkurin prátar saman um myndirnar á bls. 72. Næmingarnir finna síðani navnorð á myndunum og skriva tað, sum verður gjørt á myndini (sagnorðini). Síðani skulu teir lýsa persónar á myndunum (lýsingarorð) og skriva, hvar persónarnir eru staddir (fyrisetingarliður).

**Síða 75 – 77**

Á bls. 75 og 76 verður arbeitt við fornøvnum, ognar- og afturbeindum fornøvnum. Lærarin og næmingar kunnu eisini taka aftur í aftur persónsfornøvnini og ávísingarfornøvnini, sum næmingarnir hava arbeitt við frammanfyri í bókini.

Á bls. 76 er ein fyrisøgn, sum næmingarnir lesa sjálvir ella saman, áðrenn hon verður skrivað.

**Síða 78 – 81**

Í skríninum verður tikið saman um tað, sum næmingarnir hava arbeitt við í bókini, og tí eiga teir at kunna arbeiða við hesum uppgávunum sjálvstøðugt.



© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur

ISBN 978-999182055-2
9 789991 820552

Føroya Skúlabókagrunnur

© 2010, Føroya Skúlabókagrunnur